FFbladið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 318 Hósdagur 20. mai 2004 12,-



## Heimsumsiglari í Føroyum

Rudolf ferðast kring knøttin í báti. Føroyar eru á rutuni.

Síða 2

Norðmenn undir krígnum, 3. partur:

# Tá Johannes mundi fingið bumbu undir vangan





"Silva" var eitt av norsku skipunum í Føroyum. Teir vórðu raktir av "óskaðiligari" týskari bumbu.

Síða 9

## Samkoma fyri manningini á Kongshavn

Herfyri hittust 24 av gomlu manningini á "Kongshavn". Vit hava frásøgn.

Síða 6

## Kensluborin sameining

Russisku sjómenninir frá "Mekanik Tarrasov" takka aftaná 22 ár fyri lívið.



Síða 13

## Arbeiðsmaður á fólkatingi

Vit hava hitt Ole Vagn Christensen – ein av fáu arbeiðsmonn-unum í Fólka-tinginum.



Síða 20

Nær er Hermann serfrøðingur og nær trúboðari?

Síða 8

KÄRCHER

Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.
Vit umvæla eisini
TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42

Vit selja DAEWOO bátamotorar
frá 70 hk til 1.000 hk

DAEWOO
Umboð: Thorleif Samuelsen
Undir Gráasteini 68 · Tórshavn
Tlf: 31 77 13 · Fartlf: 28 31 38
E-mail: thorsam@post.olivant.fo

Nýggj tlf. nr.
Tórshavn
30 11 00
Skála
30 11 60
SKIPASMIÐJAN
www.faroeyard.fo

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

FF-blaðið: Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
Útgevari: Føroya Fiskimannafelag

Blaðstjóri: Óli Jacobsen
Layout: Føroya Fiskimannafelag
Prenttilgerð: Føroya Fiskimannafelag
Prent: Prentmiðstøðin

Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin

- kemur út annanhvønn hósdag

# Heimssiglari í Føroyum

Hesa árstíðina koma nógvir útlendskir bátar á Havnina úr ymiskum londum og heimspørtum. Nógvir av teimum, sum eru við hesum bátum, eru áhugaverdir persónar, sum hava eina serliga søgu at greiða frá.



*Her eru Bozena og Rudolf inni á skrivstovu FFs.*

Nú um dagarnar høvdu vit vitjan av einum slíkum. Hesin var Rudolf Krautschneider, úr Tjekkia. Fólk úr nógvum ymiskum londum búgva í Føroyum, og teirra millum eru eisini tjekkar, sum eru búsitandi her. Bozena Rasmussen er ein teirra, og hevur búð her í nógv ár. Rudolf hevði spurt onkran, um nakar tjekki búði í Føroyum og hevði tí fingið samband við Bozenu, og orsakað av kennskapi hendan vegin, komu tey bæði inn á gólvið á FF, har vit fingu áhugaverdu søguna hjá Rudolf.

Rudolf var sjálvur annar á Havnini við báti sínum "Polarka" – navnið vísir til pólarnar báðar. Í hesum umfarinum hevur Rudolf siglt úr Danmark umvegis Hetland til Føroyar (Havnar). Higani var farið til Fuglafjarðar og síðani til Seyðisfjarðar í Íslandi.



*Ikki sær "Polarka" nógv út fyri verðini, sum hann liggur í Havn.*

Rudolf hevur áður verið í Føroyum við báti sínum. Hetta var í 1975. Og hann tekur til ta móttøku, hann fekk í Føroyum tá, í mun til móttøkuna hann seinni fekk í Noregi. Úr Føroyum fór hann til Íslands og skuldi fara hagani til Grønlands. Men veður og umstøður gjørdu, at hann endaði í Noregi, har hann var hildin at vera ein kommunistiskur njósnari, sum eingin vildi vita av. Í Føroyum var hann komin inn á Vág, og har varð hann móttikin við opnum ørmum og møtti allari tí vælvild sum hugsast kundi.

Rudolf er ein sera fjølbroyttur persónur. Hann er føddur í 1943 í Eysturríki, sum tá var nasistiskt. Longu sum smádrongur flutti hann til Tjekkoslovakia, sum stutt eftir gjørdist kommunistiskt.

### Í slóðini hjá Magellan

Rudolf er fyrst og fremst bátabyggjari og siglari. Hann hevði hoyrt um Ova Joensen í Nólsoy og varð sera hugtikin av honum. Hann hevði hug at síggja bátin hjá honum og at fáa meira at vita um hann. Hesum kundu vit skipa fyri.Vit ringdu til okkara mann í Nólsoy, Marner á Skúr, og spurdu, um hann kundi taka sær av Rudolf, um hann kom út til Nólsoyar. Tað var gamaní, og tey bæði Rudolf og Bozena fingu nakrar sera áhugaverdar tímar í Nólsoy saman við Marner. Rudolf hevur stóran áhuga í at hjálpa til at fáa bátin hjá Ova varðveittan til komandi ættarlið.






Rudolf hevði eisini áhuga fyri bátasmíði. Her fingu vit skipað soleiðis fyri, at hann kundi vitja bátasmiðin, Andrass Joensen, sum fyrr hevur verið umrøddur her í blaðnum. Her fekk Rudolf at síggja Andrass umvæla ein bát og fekk so prátað um bátasmíð yvirhøvur. FF gav Rudolfi doktararitgerðina hjá Andrassi Mortensen um føroyska bátin. Í bókini er ein samandráttur á enskum, so á tann hátt hava vit útflutt vitan um føroyska bátin.

Sjálvur hevur Rudolf verið við til at smíða fleiri bátar og skip. Tann mest áhugaverda verkætlanin á hesum øki er, at Rudolf saman við 8 øðrum tjekkarum nýtti trý ár til at byggja eitt kopi av skipinum "Victoria" hjá Magellan, sum var fyrsta skip, sum sigldi kring allan knøttin.

Og nýggja "Victoria" hevur við eini manning upp á níggju fólk gjørt sama roysni sum Magellan gjørdi á sinni.

### Skrivað bøkur

Rudolf hevur ferðast nógv kring knøttin og hevur skrivað fleiri bøkur um tað. Tilsamans hevur hann skrivað einar 9 bøkur. Ein er í hvussu er, týdd til enskt og eitur "Around the World for the feather of a penguin" ella leysliga týdd: "Kring heimin eftir einari pingvinfjøður". Hendan bókin hevur selt væl og er eisini ein spennandi lýsing av lívinum hjá einum ævintýrara. Hann skrivar eisini greinar til altjóða tíðarrit um sínar ferðir.

Rudolf hevur altíð havt hug til sjógvin og hevur, so nógv sum nakar, fingið øll síni ynski á hesum økinum uppfylt.

Í 1982, tá argentinar hersettu Falklandsoyggjarnar, lá hann við báti sínum inni í Falklandsoyggjunum. Síðan hevur hann vitjað aftur har, men nú var støðan broytt. Nú vóru 3 bretskir hermenn, sum vardu hvønn einstakan av teimum knappliga 2.000 íbúgarum á oynni. Bókin hevur áhugaverdar myndir og Rudolf hevur sjálvur teknað myndir í bókini. Rudolf hevur eisini gjørt filmar um sítt virksemi, og hava hesir verið vístir í sjónvarpi.

Rudolf greiðir sera hugtakandi frá teimum plássum, sum hann vitjar á sínum ferðum, og vit fara seinni at venda aftur til hansara frásagnir. Uttan at lata okkum sláa um koll av krúnprinsabrúdleypinum í seinastu viku, hevur hann eisini verið í Tasmania, sum hann eisini hevur eina drúgva frágreiðing um.

### Hugsar eisini um síni medmenniskju

Rudolf hugsar eisini um síni medmenniskju. Hetta ger hann á tann hátt, at hann hvørt summar í juli mánaði bjóðar foreldraleysum børnum úr Tjekkia og Polen siglitúrar. Børnini eru upp til 18 ár. Sum kunnugt liggur Tjekkia mitt inni í Europa, so hansara bátar liggja í Stettin í Pólandi, og higani siglir hann út í Eystursjógvin. Hetta arbeiði ger Rudolf út frá tí sjónarmiði, at børnini eru okkara tjóðarskattur, og tí ræður um, at tey vera viðfarin samsvarandi. Tí vil hann eisini gera sítt til at gera lívið ríkari hjá børnum, sum hava mist so nógv, sum tað at hava mist foreldrini.

Men Rudolf ger meira enn hetta. Um veturin siglir hann við ungum kriminellum. Hetta ger hann fyri at royna at fáa tey aftur á rætta kós, áðrenn tey vevja seg upp í tað, sum verri er. Hann trýr upp á, at tann meiri harðbalna vetrarsiglingin herðir tey ungu meira, enn lagalig summarsigling vildi gjørt.

Tað er eingin ivi um, at Rudolf hevur fingið stóran áhuga fyri Føroyum, og einum slíkum manni kunnu vit uttan iva fáa nyttu burtur úr. Sjálvur hevur hann nevnt møguleikan at gera sítt til at fáa fleiri ferðafólk til Føroya.

Vit fara uttan iva at frætta meira frá Rudolf sum frá líður.



*Børnini eru tjóðardýrgripurin. Tí hevur Rudolf eisini umsorgan fyri teimum, sum greitt frá í greinini*



*Rudolf lá inni í Falklandsoyggjunum, tá kríggið byrjaði í 1982. Hetta er eitt súmbol fyri hvalaveiðu gjørd úr rivjabeinum á hvali.*



*Victoria er ein eftirgerð av skipinum hjá Magellan við sama navni, sum var fyrsta skip, sum sigldi kring knøttin. Rudolf hevur sjálvur endurtikið hetta roysni.*



**Vit gera allar vanligar bilumvælingar sera bíliga - so sum:**

Oljuskift, motorjusteringar

Umvæla bremsir, koplingar v.m.

For- og bakhjólsleiðir og akslar

Og so hava vit tey vælumtóktu "TYFOON" dekkini, sum vit skifta

**Sp/f Úrvalsbilar**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444943 · 281943 · 217704

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

**Pf. Petur Larsen**
Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

AGN



sild
kúfiskur
makrelur
høggusløkkur

hava dagligt samband um alt landið

**P/F KAMBUR**
STRENDUR · telefon: 447720
ella 448095 · fax: 448744

SENT VERÐUR VIÐ STRANDFERÐSLUNI

veður allan dagin, men um kvøldi kom stormur av landnyrðingi, so vit máttu leggja til. Vit lógu tildreyðaðir í eitt gott samdøgur og fóru aftur at sigla út móti midnátt hin 13. oktober.

Tann 14. oktober var gott veður, men tann 15. frískaði hann vindin lágt til stormi. Vit máttu leggja til kl.18, men fóru aftur at sigla kl. 22, tá tað blíðkaði aftur. Síðan høvdu vit gott veður, og vit komu í Mykines um kvøldi hin 18. oktober. Vit vóru á Havnini um eitt-tíðina á nátt hin 19. oktober.

Fiskurin varð landaður í Kristiansand í Noregi og vá 270 tons ( 270.685 kg), umroknað vóru tað **1.692 skippund.**

## Bátarnir vóru hesir:

| | |
|---|---|
| **"Falkur"** | formaður Hendrik Poulsen, Toftir, Steingrim Joensen, Toftir, Virgar Midjord, Hvalba og Ludvig Dam Jacobsen, Tórshavn. |
| **"Turid"** | formaður Elisander Jensen, Toftir, Petur Jacobsen, Hvalba, Jákup Næs Joensen, Hvalba og Mortan Vang, Hvalba. |
| **"Trý systkin"** | formaður Eli Jensen, Hellurnar, Magnus Dam Jacobsen, Tórshavn og Ellintur Abrahamsen, Fuglafjørð. |
| **"Toftanes"** | formaður Bjørn Hansen, Nólsoy, Magnus Anton Højgaard, Skúvoy og Johan Thomsen, Hvalba. |
| **"Glansur"** | formaður Høgni Thomsen, Nólsoy, Jákup Vang, Hvalba og Bjarni Dalsgaard, Tórshavn. |

## Manningin á "Kongshavn" í 1965:

| | |
|---|---|
| Skipari | Jacob Højgaard, Toftir – *f. 9/7-16* |
| 1. bestimaður | Elisander Jensen, Toftir – *f. 9/3-12,* bátsform. |
| 2. bestimaður | Joen Hendrik Poulsen, Toftir – *f. 28/10-16,* bátsform. |
| 1. motormaður | Niclas Højgaard, Toftir – *f. 19/4-44* |
| 2. motormaður | Jens Pauli Poulsen, Tórshavn – *f. 1/11-20* |
| kokkur | Salomon Johannesen, Hellurnar – *f. 13/9-14* |
| messudrongur | Egin Midjord, Argir – *f. 6/1-51* |
| bátsformaður | Eli Jensen, Hellurnar – *f. 25/10-32* |
| " | Bjørn Hansen, Nólsoy – *f. 3/2-42* |
| " | Høgni Thomsen, Nólsoy – *f. 7-12-38* |
| dekkari | Petur Jacobsen, Hvalbæ – *f. 14/8-25* |
| " | Ellintur Abrahamsen, Fuglafjørð – *f. 14/4-49* |
| " | Magnus Højgaard, Skúoy – *f. 31/8-05* |
| " | Steingrim Joensen, Toftir – *f. 27/6-48* |
| " | Óla Svend Kjærbech, Sumbæ – *f. 18/10-17* |
| " | Herluf Olsen, Tórshavn – *f. 16/7-25* |
| " | Magnus Dam Jacobsen, Tórshavn – *f. 6/7-35* |
| " | Mortan Vang, Hvalbæ – *f. 23/11-23* |
| " | Virgar Midjord, Hvalbæ – *f. 20/9-48* |
| " | Jákup Vang, Hvalbæ – *f. 19/11-34* |
| " | Johan Thomsen, Hvalbæ – *f. 28/6-45* |
| " | Jákup Næss Joensen, Hvalbæ – *f. 8/8-46* |
| " | Oliver Berg, Hvalbæ – *f. 28/7-13* |
| " | Ludvig Dam Jacobsen, Tórshavn – *f. 19/9-38* |
| " | Bjarni Dalsgarð, Argir – *f. 24/11-49* |

# Manningin er av "Ellu"




*Teir av manningini vit hava staðfest eru:*

*1. Dánjal Olsen, Oyrabakki, Sandoyar-Dánjal. 2. Kristian Johansen á Neystabø, Haldórsvík. 3. Adrian Johansen, Strendur. Var beiggi skiparan. 4. Hildibrandur Johannesen, í Vørutoft, Sandur. Allir hinir eru eisini av Sandi. 5. Mads Andreas Johannesen, Dia í Vørutoft. 6. Rudolf Jensen undir Kvíggjunum (gjørdist 100 ár). 7. Mikkjal Viderø, á Breiðateigi. 8. Edvard Hentze, í Skorti. 9. Zacharias Stórá, Skopun. 11. Arne Davidsen, hjá Kitti. 12. Sigurd Poulsen, á Túgvunum. 13. Johan Hentze, í Skorti.*

*Nr. 4 og 5 vóru brøður. Nú er tað bara nr. 10, sum vit ikki kenna. Um nakar kennist við hann, vilja vit fegin frætta.*

Hendan myndin, sum vit høvdu í seinasta blaði, vísir seg at vera manning av "Ellu" í 1931. Skipari hetta árið var Anthon Johansen av Strondum.

"Ella" var ein trímastrað skonnart, ið varð bygd í 1910 í Malo í Fraklandi. Hon æt tá "Grand Hermine" og merkt til 235.58 br.tons.

Fiskipartafelagið "Kenn" í Tórshavn keypti hana úr St. Malo við skjøti frá 29. desember 1929, og fekk hon tá navnið "Ella". Í nevnd felagsins var Carl á Lag, keypmaður í Havn, ið var formaður, kaptajn Einar Mikkelsen, kendi grønlandsfararin, og so ein dani.



*"Ella" seinni "Sólarris".*

Í 1930 førdi Edvard Gjoveraa hana suðurlandstúrin, meðan Jóan Jákup Simonsen var skipari grønlandstúrin.

Skipið lá í 1932 og varð síðan selt vestur í Vágar og fekk navnið "Sólarris". Hon minusprongdist í 1941. Manningin rak á einum flaka í fleiri samdøgur, áðrenn hon varð bjargað.

Fyri at koma aftur til myndina. Tað var ivi um, hvørjum skipi manningin var við. Men ein av henni er á lívi, og er tað Zacharias Stórá í Skopun, sum er uppí í 90-unum. Hann fekk greitt hendan spurning.

Annars hongur myndin í ungmannafelagshúsinum á Sandi.

# Enn ein mynd

Vit hava fingið eina gamla manningamynd aftrat. Tað sær út til, at myndin er tikin á sama stað. – Kennir nakar hesar?



# Samkoma fyri manningini á "Kongshavn"

Fyri góðum ári síðani varð skipað fyri samkomu fyri manningini á "Vesturhavinum Blíða", sum var fyrst bygda línuskipið, og sum kom til Føroya í 1956. Hetta gav okkum høvi til at festa søguna hjá hesum skipi og hesi manning á blað. Og var hetta eitt gott íkast til okkara fiskiskipasøgu. Hetta var eitt gott dømi um, hvat ið kundi koma burtur úr eini slíkari manningarsamkomu.



Dýrdarveður inni á fjørðinum saman við ræstu greipunum, sum er eyðkennið fyri føroyskt fiskiskip.

Herfyri var ein líknandi samkoma fyriskipað fyri teir, sum høvdu verið við "Kongshavn". Fyriskipari var Bjarni Dalsgarð saman við øðrum, sum hava verið við hesum skipi í árunum 1964-67. Bjarni var fyrst við sum kokkadrongur, síðani sum dekkari og seinast sum kokkur. Teir, sum beinleiðis vóru bodnir við, var manningin, sum hevði verið við hesi árini. Men samstundis var gjørt greitt, at høvdu aðrir av manningini, sum ikki høvdu verið við hesi árini, hug at koma við, so skuldu teir vera vælkomnir. Tað sum lá aftanfyri hugskotið hjá Bjarna var at fáa hetta í lag, so partur av hesi søgu kundi varðveitast. Nógvir av manningini hava rokkið ein slíkan aldur, at teir høvdu neyvan kunnað verið við, um drálað varð ov leingi, og tá vildi hugskotið at savna manningina havt minni virði.



Komið er at borði við fullum báti.

Úrslitið gjørdist, at 24 av gomlu manningini hittust í apríl inni á Sjómansheiminum í Runavík. Allir eru nú tilkomnir menn. Tann elsti var tann skjótt 90 ára gamli Salomon Johannesen av Hellunum, sum fleiri ár var kokkur. Hann var annars eisini við Báruni, tá Óli Jacobsen fór til skips í 1958.

Hetta var ein stak hugnaligur dagur, har menn veruliga fingu frískað upp minni frá farnari tíð. Teir fingu prátað saman, sungið saman og annars hugna sær.

Bátafiskiskapur var eitt serligt kapitul í okkara fiskiskapssøgu, sum vit fegin vilja vera við til at lýsa. Her kann verða skoytt uppí, at vit eru í holt við at savna tilfar um "Ananu", sum í 30-unum royndi tað sama. Men hetta var í størri stíli. Við vóru 26 bátar og samlaða manningartalið var 160!

Vit hava fingið myndir frá umrøddu samkomu. Hesar eru tiknar úr eini videoupptøku, og vit fara at royna at lýsa samkomuna so væl, sum tað nú er gjørligt við hesum myndunum. Samstundis hevur Eli Jensen av Hellunum latið okkum eina frásøgn frá einum av teimum árunum, tá hann var við. Okkara lesarar kenna óivað Eli frá hansara ferð í Grønlandi seinasta summar til tey gomlu útróðrarplássini. Frásøgnin hjá Eli er eisini eitt gott íkast til lýsingina av hesum fiskiskapi.



Kokkurin Salli við einum stórum kalva. Hann varð gjørdur til døgurða, men tíverri var hann so feitur at manningin fekk ilt í búkin.



Bátaskip í "rad og række", Atlantsfarið, Marité og Kongshavn.

Hesin fiskiskapur er áður lýstur í bókini hjá Magnusi Dam Jacobsen "Í Grønlandi við Kongshavn", sum kom út í 1976, og sum umrøður ein túr við Kongshavn í 1965.

Hetta gevur høvi til at taka okkurt burturúr bókini hjá Magnusi, eins og onkrar myndir, úr hesi bókini, verða tiknar við.

### Um Kongshavn

Magnus sigur m.a. í sínum fororði:

Eitt skip er sum eitt menniskja, soleiðis eisini við bátaskipinum "Kongshavn", sum var móðurskip okkara hesar 5 mánaðirnar. Hon var heimið, tryggleikin og álitið. Sum vit kendu okkum væl, tá vit sóðu hennara tjøraða skrokk daga undan. Hon var matur, ljós, hvíld og fløvi. Nú liggur hon, eins og "Tinganes", á havsins botni, ikki nakar ringur endi fyri eitt skip. Móðurskip? Hetta er eitt gott orð, tí soleiðis eru kenslur mínar fyri hesum skipi, sum ein móður, heit og fjálg.

Um skipið "Kongshavn" skrivar Jacob Højgaard, skipari:

Eg var við at keypa skipið m/s "Kongshavn", hon kallaðist "Falken", saman við D.P. Højgaards eftf., Toftir í 1947 úr Ålborg. Skipið var bygt á Turø í 1912 úr eik og álmviði. Hon var 3 mastrað skonnart við 180 hk motori Alpha Diesel. Vit sigldu tvey tey fyrstu árini í farmasigling millum tey skandinavisku londini og Føroyar. Síðan varð hon lagt um til fiskiskap; sild og saltfisk. Í 1955 varð hon seld og keypt aftur av mær, Magnus Mikkelsen og Jógvan á Dul, Tórshavn. Vit stovnaðu partafelag, ið kallaðist Navigare, Toftir. Sama ár var farið til Grønlands at fiska saltfisk, og um heystið var farið til Esbjerg at avreiða. Árið eftir keypti Jóhan Hendrik Poulsen, Toftir, partin frá Jógvan á Dul, sum samtíðis gekk úr felagnum. Sama vetur var farið til Frederikshavn at skifta motor, ein 300 hk Alpha Diesel, og tóku vit tá mittmastrina úr skipinum. Hetta arbeiði var liðugt fyrst í juni mánaði. Síðan varð farið til Grønlands í fiskarí. Grønlandsfiskiskapurin helt fram øll hesi árini, til hon varð seld í 1974. Sjálvir sigldu vit fiskin hartil, hann var seldur, annaðhvørt Danmarkar ella Noregi. Skipið varð í 1974 selt til Føroya Eggvirki, Rituvík, og brúktu teir hana til at flyta høsnafóður úr Danmark. Í november sama ár á ferð úr Ålborg til Føroyar við fóðri og 8000 høsnarungum, komnir upp í Lesse Renne, kom eldur í skipið og sakk tað har á staðnum. Manningin varð bjargað av íslendskum farmaskipi. Hetta var endin á Grønlandsfararanum m/s "Kongshavn".

Brot úr bókini hjá Magnus

Bókin hjá Magnusi er sera áhugaverd og eisini sera háfloygd. Hann umrøður nógv annað enn túrin við Kongshavn. Hann kemur inn á ættarviðurskifti síni og eisini inn á átrúnaðarlig viðurskifti.

Vit fara at endurtaka okkurt dagbóksbrot, sum kann lýsa "stemningin" hjá fiskimanni, sum t.d. tann 17.9:

"Veðrið er gott, men lítið er til av fiski, og hann hevur ljóta veðurætlan. Vindurin er longu mundandi vaksin. Vit hava sæð nógvan springara í dag. Teir bóltaðu um alt havið á veiðuferð eftir sildini.

Fáa vit fulla last, verður úrtøkan ikki heilt av leið, 14-15.000 kr, sum prísirnir ljóða í løtuni. Hetta forkolaða arbeiðið! Vinda og vinda frá morgun til kvølds. Frá fyrstu ljósrípu til myrkrið sígur um bátin. Árið er rættuliga farið at halla, og kaldari er. Ófýsið er at rýma úr tí fjálgu koyggjuni út í kuldan og vindin. Tað einasta, ið setur dám á tann keðiliga dagin er, tá glaðustrokið kemur stiklandi gjøgnum fjørðin, kastar seg niðurá bátin, rystir og skakar hann, roynir at skræða klæðini av okkum. Svartir sjófulgar reka framvið.

Luddi sjálvur annar skóru í nátt upp í eina tunnu av kjálkum og saltaðu teir. Hetta er góð inniløga og kostar bert arbeiðið. Turran fisk hava vit í hópatali, lippur eisini. Hvønn sunnudag gongur leiðan niðan á bátadekkið at kanna greipurnar, so ormur ikki kemur í. Men nú er so langt liðið at vandin er av. Men hetta at hyggja at greipunum er vorðin ein vani. Seinast vit vóru í Føroyingahavnini kom týskur trolari inn eftir fjørðinum. "Har eru føroyingar umborð", helt ein av manningini fyri. "Hvar veitst tú tað frá", spurdi eg. "Tað sært tú við at hyggja at øllum greipunum, ið afturi á hekkuni hanga."

Eftir vælgjørt arbeiði stoktu vit kjálkar, bakaðu pannukøkur og deildu eitt perublikk. Turid fekk ein springara í gjár. Elisandur gav honum kúluna. Teir fingu skutulin í hann beinanvegin, syftu inn um og skóru á háls. Livur og stokt tvøst var døgverðin í dag, óført. Luddi hevði føðingardag, so hann evnaði til tríggjar lagkøkur í eini handavending. Hann fekk næstan ikki rørt seg fyri manningini, ið ikki mætari enn smábørn stóðu og mungaðu. Skjótt var borðreitt, kaffi skonkt, køkurnar horvnar sum døgg fyri sól. Luddi er bakari, so her lá alt raðið.



*Herluf hjá Húsamarius var ein býarmynd í Havn. Altíð smílandi, so hann fekk navnið Sunshine.*



*Ellintur Abrahamsen, 15 ára gamal.*



*Kongshavn.*

Video kann fáast

Á samkomuni var videofilmur upptikin. Upptøkan kann fáast frá:

Sjónband
A. C. Evensensgøta 1
Tórshavn
Tlf. 317774 og 217774

SAXO'FØN
TLF. 31 68 08




**Sjálvuppgávur og roknskapir 2003**

**Innlatingarfreist**

Feløg, felagsskapir deyðsbúgv v.m. - við roknskaparskyldu - skulu lata inn sjálvuppgávur og roknskapir viðvíkjandi árinum 2003 í seinasta lagi

**1. juni 2004**

um roknskaparskeiðið endar í ella fellur saman við álmannakkaárinum 2003.

Sí eisini heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

Toll- og Skattstova Føroya
Argir, 17. mai 2004

## 1. umfar í Amnesty-kappingini

Røttu svarini uppá spurningarnar í fyrsta umfari eru:

1. 28. mai 1961
2. 30 greinar
3. Steðgið harðskapi móti kvinnum
4. 6,50 kr í Evropa og 8,00 kr til onnur lond

Vinnararnir eru:

Heri Joensen, Brøndby – Discman frá Radiohandlinum, virðið 695 kr.

Jóannes Nolsøe Petersen, Argir – Sodavatn frá Føroya Bjór

Janus Dragasund, Tórshavn – Gávupakka frá Landshandlinum

Annað umfar er byrjað! Far inn á heimasíðuna www.amnesty.fo og royn teg. Um tú ikki veitst svarini frammanundan, so kanst tú finna tey við at leita á heimasíðuni!

Kappingin er í 5 umførum, hvørt við fýra spurningum. Drigið verður annað hvønn týsdag, næstu ferð 25. mai 2004. Øll, sum svara rætt, eru við í lutakastinum um 3 vikuvinningar og so høvuðsvinningin, sum er ein Pocket Loox lummatelda, virðið 5.000 kr.

Kappingin er fyri øll, og tað er ókeypis at vera við. Sig eisini vinum tínum frá um kappingina.

Øll kunnu vera limir í Amnesty International Føroya Deild – tað kostar 180 kr. árliga (50 oyru um dagin) fyri ung/lesandi. Tú kanst eisini tekna teg til at Skriva fyri Lívi. Tað kostar bara 3 frímerkir og 5 minuttir um mánaðin – og kann merkja lív ella deyða fyri ein fanga úti í heimi!

# Nær er Herman búskaparfrøðingur, og nær er hann "trúboðari"?

Tað er neyvan ivi um, at Hermann Oskarsson er ein líka frægur búskaparfrøðingur og embætismaður sum onkur annar. Tað er eisini kent, at hann hevur sera avgjørdar meiningar – eisini uttanfyri júst hetta øki.

Samstundis er hann so "heppin" at vera ein av teimum, sum av fjølmiðlunum verður roknaður fyri at vera serfrøðingur í stórt sæð øllum millum himmal og jørð.

Hetta er heldur ikki nakað, sum hann hveppir seg við, og tí kann tað stundum vera ringt at vita í hvørjum eginleika, hann úttalar seg, tá hann verður spurdur um eitt ella annað. T.v.s. um tað er sum formaður í Búskaparráðnum ella sum privatpersónur.

Tað kann gerast sera vandamikið, um privat sjónarmið hjá slíkum persónum uttan víðari verða upphevjað sum vísund og nærum til bíbilskar sannleikar. Spurningurin er, um tað ikki er hetta, sum júst hendir í teirri samrøðu, sum Sosialurin hevur við Hermann herfyri um tilmælið hjá rækjunevndini.

Her førir Hermann fram generel sjónarmið um studning, sum eru prinsipiel røtt. Sjálvsagt skal ein vinna ikki dúva uppá studning. Men tað hevur verið sera lætt at hava slík sjónarmið seinastu árini, tá alt hevur gingið eftir vild, og alt hevur gliðið av sær sjálvum.


4 Sosialurin Nr. 90 – 13. mai 2004

Studningur kostar í vælferðini

**– Hóast stór kreppan er í ávísum vinnum, eitt nú rækjuvinnuni og alivinnuni, eiga vit undir ongum umstøðum at fara út í nýggjar studningsskipanir. Hetta loysir ikki upp fyri nøkrum, men fer at kosta okkum vælferð, sigur formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson**

**Aftur at dyrgja**

**Kostar vælferðina**

*Kut úr Sosialinum.*

### Hvat gera vit, tá valið er millum produktiv arbeiðspláss og studning?

Nú er spurningurin, hvat skal gerast, tá og um støðan veruliga er tann, at valið stendur millum at lata einhvønn stuðul, **ella** at lata eina vinnu fara fyri bakka með alla. Her kunnu sjónarmið førast fram bæði fyri og ímóti, men ein má kunna vænta, at ein slíkur embætismaður veruliga kann føra fram undirbygd sjónarmið, sum kunnu vera ein partur í viðgerðini hjá báðum pørtum.

Tað ger Hermann ikki. Hann kemur við eini "svadu", sum eins væl kundi komið frá einum "miðal" løgtingsmanni. Her skulu bert verða nevnd tvey dømi.

Eitt av tí, Hermann førir fram, er: "Mælt verður til at stuðla vinnuni í tvey ár, men eg kenni onga studningsskipan, sum frívilliga er sett úr gildi aftur".

Vit eru nú eisini onnur, sum hava skil á hesum viðurskiftum og sum vita, hvat ið veruliga er gingið fyri seg á hesum øki. Í besta fall kann sigast, at Hermann ger seg sekan í snaring við veruleikanum. Her kann bert verða nevnt, at fyrst í 90-unum varð generella studningsskipanin til feskfiskaflotan løgd um til ein tíðaravmarkaðan íløgustuðul. Hetta varð gjørt á tann hátt, at í lógini varð ásett, at hon fór út gildi eftir ávikavist 3 og 5 árum. Hetta var eisini tað, sum hendi, uttan at nakað kom í staðin, og tað er eisini tað, sum verður skotið upp í rækjuálitinum. Tískil vísir royndin, at tað er munur á at avtaka eina skipan, sum er í gildi, og so í lóggávuni at avmarka hana. Tað ber væl til.

### Hvør fremur propaganda?

Støðið hjá Hermanni verður annars lýst, tá eitt notat hjá grannskoðarafyritøkuni KPMG um týdningin av rækjuvinnunu verður avvíst sum "rein propaganda". Hermann sigur, at KPMG førir fram, at 1234 føroyingar gerast arbeiðsleysir, um rækjuflotin fer.

Hetta er milt sagt ein snaring av tí, sum verður sagt. Ein snaring, sum ein kann vænta sær frá einum politikkara, men ikki frá formanninum í Búskaparráðnum. KPMG hevur sett upp eina útgreinaða útrokning um samfelagsískoytið av rækuvinnuni. Her eru ymsar fortreytir, og summar av teimum eru eisini broyttar. Men her kann ein og hvør meta um hesar fortreytir.

### Hvønn týdning hevur minking í framleiðsluvinnuni?

Ein relevantur spurningur til **búskaparfrøðingin og formannin í Búskaparráðnum** Hermann Oskarsson kundi verið, hvønn týdning tað hevur fyri eitt samfelag, at vinnutólini gerast færri.

Eitt dømi kundi verið "Hvilvtenni", sum er farin av landinum með alla. Tað er í hvussu er víst, at hetta minkar um okkara útflutning við einum 30 mill. árliga. Hetta minkar eisini um arbeiðsplássini í okkara primervinnu. Hetta má væl hava onkra aðra avleiðing. Tað kundi verið relevant at spurt HO um, hvønn týdning hetta hevur fyri búskapin í samfelagnum.

Tá hvørki Sosialurin ella nakar av teimum – eftir egnum tykki – professionellu fjølmiðlunum seta hendan spurning, vilja vit hesum seta hann her.

Hermann skal fáa blaðrúmd í komandi blaði at svara hesum sera relevanta spurningi.

# Feskfiskaveiðan er nógv minka

Veiðuhagtølini fyri fyrsta ársfjóðring í ár vísa at virði á t.d. upsaveiðuni er fallið niður um eina helvt av virðinum sama tíðarskeið í fjør. Minkingin í veiðuni merkist longu nú væl í fiskivinnuni bæði á sjógvi og á landi.

Tað er týðiligt út frá almennu veiðuhagtølunum fyri fyrsta ársfjóðring at tað er nógv minni áhugavert at veiða upsa, í mun til fyrsta ársfjóðring í fjørð. Miðal kiloprísurin fyri allar støddir av upsa er lækkaður eina knappa krónu svarandi til 23 prosent. Samstundis er veiðan minka við 5.400 tonsum svarandi til 41 prosent. Tá bæði prísurin og nøgdirnar minka so nógv so gongur tað sjálvandi eisini út yvir samlaða veiðuvirði á upsanum, sum er minka við góðum 30 milliónum krónum svarandi til 55 prosent.

Toskaveiðan er sama tíðarskeið minka 5 prosent í nøgd og 11 prosent í virði. Meðan hýsuveiðan er minka 1 prosent í nøgd og 26 prosent í virði.

Samanlagt er feskfiskaveiðan sum heild minka við 17-18 prosentum bæði í nøgd og virði fyrsta ársfjóðring í ár í mun til sama tíðarskeið 2003.

Verður hugt eftir býtinum á feskfiskaveiðuni eftir skipabólkum ella reiðskapi er týðuligt at tað eru trolveiða sum hevur tað stóru minkingina í nøgd og virði. Línuveiðan er hinvegin vaksin 5 prosent í nøgd, men minka 12 prosent í virði. Línan stendur fyrsta ársfjórðing fyri knappari helvtini av feskfiskaveiðuni í nøgd og góðari helvt í virði.

Heldur gongdin fram við so stórum minkingum kemur tað eisini at merkjast í øðrum vinnum og í samfelagnum sum heild.

Klaksvíkar Sjúkrahús

Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur

frá SAHVA, verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 15. og 16. juni 2004, og á Landssjúkrahúsinum 17. juni 2004.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 455463, týsdag og mikudag kl. 10-12, í seinasta lagi týsdagin 8. juni 2004.

## Norska flóttaskipið: "Silva"

**At taka úr blaðnum**

**Síðurnar 9, 10, 15 og 16 kunnu takast úr blaðnum**

# Tá Johannes mundi fingið bumbu undir vangan

Ein greinarøð við søguligum tilfari sum hendan um norsku flóttarfólkini í Føroyum, hevur tað við sær, at alt meiri og meiri kemur undan kavi, og tað er eisini hent í hesum føri. Vit eru komin í samband við aðrar føroyingar, sum hava kent norðmenn og siglt saman við teimum. Nógvir fiskimenn hava siglt saman við Ervik brøðrunum, og teir láta sera væl at, hvussu góðir teir vóru við føroyingar. Vit kunnu nevna her, at tá Ervikreiðaríið fór at royna seg við trolarum, og teir fingu sín fyrsta "Labrador", tá fingu teir tann kenda føroyska skiparan Kaj Johannesen at vera við fyrsta túrin, so hann kundi leggja teimum lag á.

Nógv norsk skip komu til Føroya. Eitt teirra var "Silva", sum var ein umbygdur hvalafangari. Tá Noreg varð hersett, høvdu teir júst verið á kópaleiðunum við útgerð, og vóru á veg heimaftur. Teir vildu ikki fara aftur til Noregs, men løgdu leiðina til Føroyar. Ein av monnunum sum kom til Føroyar tá, var Knud Brandal, sum giftist í Føroyum og eins og Esther Støylen varð hann verandi í Føroyum alt lívið.

"Silva" fór at sigla við ísfiski úr Íslandi til Bretlands. Tveir føroyingar sigldu við teimum, so manningin taldi 8. Føroyingarnir vóru Petur Heimá, ættaður úr Sørvági, búsitandi í Havn, og Johannes Henriksen úr Sørvági. Vit hava hitt tann nú 86 ára gamla Johannes á máli. Hann var við "Silva" í hálvtfjórða ár.

Tað fyrsta árið sigldu teir við ísfiski úr Íslandi til Bretlands, men so vórðu teir bumbaðir eina ferð, teir lógu á Klaksvík.

**Um hesa hending skrivar Niels Ihlen:**

En av fiskebåtene m/s "Silva", som var kommet over til Færøyene etter krigens slutt i Nord-Norge, hadde en nokkså ubehagelig oplevelse inne i Klaksvikfjorden i 1942. Den var netop kommet tilbake fra Storbritannia etter å ha solgt sin fiskelast der nede, og holdt på å gjøre sig klar til næste fisketur, da tyske fly kom i lav højde og bombet skibet i havnen der. Skipperen Landmark og et par mand var ombord. Et par bomber faldt like ved skibet, som begynte å synke, men ved åndsnærværelse og godt sjømandsskab fik Landmark, til tross for at motoren ikke var i gang, trukket skipet ind på grunt vand der det blev stående. Redeeren ringte til konsulatet og fortalte om ulykken. Han og alle nevnte, at det hadde været et "nær miss", og at båten hadde fået en lekk. Han ba konsulatet om å skaffe pumper fra Tórshavn, så skibet kunne blive pumpet lens og tettet. Jeg fik sendt pumper av gårde, men så kom overraskelsen. Det viste sig ikke å være noe "near miss", men tvert imot en fuldtreffer. Bomben hadde gått inn under vannet på styrbords side, hvor der var et stort hull, hoppet over maskinen uten å gjøre skade og la sig pent til rette på bakbords side i maskinrommet uten å eksplodere. Forskrekkelsen var jo stor, men en 22 årig engelsk bombeekspert satte sig roligt overskrevs på bomben og demonterte detonatoren som det var verdens naturligste ting. Man må vel ha lov til å sige at disse brittene er noget for seg selv.



*Skiparin á "Silvu" var Bertel Kristian Landmark.*

Hendingin fór fram 11. okt. 1941. Tað skal sigast sum viðmerking til frágreiðingina hjá Ihlen, at tað var ikki skiparin, Landmark, men stýrimaðurin Mons Stormark, sum var umborð saman við Petur Heimá og Jóhannes Henriksen. Bumban kom inn gjøgnum skrokkin bakborðsmegin og legði seg stýriborðsmegin.

Johannes var sjálvur í maskinrúminum, tá bumban kom inn gjøgnum skipssíðuna, so tað er lætt at ímynda sær, at hann hevur fingið ein skelk.

Tann 21. nov. 1972 stóð í Dimmalætting eitt lesarabræv, sum Petur Heimá hevur skrivað. Vit endurgeva hetta við onkrum ískoytum frá Jóhannes:

"Í útvarpinum herfyri hoyrdu vit um bumbingina undir krígnum í Klaksvík. Har var sagt um norska bátin "Silva", at bumban fór niður ígjøgnum dekkið.

Eg var við sjálvur og stóð tá á bátadekkinum og sá flúgvaran, íð vísti seg at vera lítið yvir mastratoppinum. Eg sá eina lúku opna seg og bumbuna koma út og koma í sjógvin einar 10 til 15 m frá skipssíðuni, og rakti hon skipið bakborðsmegin undir vatnlinjuni, gjørdi eitt hol eftir seg uppá 1 m annan vegin og 1,5 m hin vegin. Velið var hangandi eftir í holinum. Bumban breyt ljósmotorin, sum var í gongd, fór síðani upp um motorin – fremsta toppstykkið var av, tí vit reinsaðu motorin – hon boygdi stytturnar. Bumban legði segði seg so á dúrkið millum motorin og skipssíðuna stýriborðsmegin.

Petur Dahl fekk ljósmotorin til maskinskúlan á skiparaskúlanum.

Annar meistarin, Jóhannes Henriksen, sum var staddur í maskinrúminum, slapp upp í øllum góðum við vátum føtrum. Vit tríggir fingu sett skipið á land, áðrenn tað sakk, við hjálp frá landi av.

Tá íð vit vóru á veg umborð at bjarga skipinum, kom flúgvarin aðru ferð og skjeyt eftir okkum – kúlurnar komu allastaðni í sjógvin rundan um bátin.

Meðan vit vóru umborð og sleptu teymin, kom flúgvarin 3. ferð og slepti tá aftur eina bumbu, sum ikki brast, og meini eg, at hetta er tann bumban, sum nú er funnin og tikin upp.

Bumban, sum lá í maskinrúminum, var sett til at bresta uppá tíð. Tíðarurið var í gongd men steðgaði av irring, søgdu eingilskmenninir, sum avmonteraðu hana - til alla lukku fyri okkum. Gud havi lov."

Bumbuálop hevði verið á Klaksvík dagin fyri, 10. okt., tá" Fugloyggin" var søkt og skaði kom á fundamentið á keiuni. "Silva" lá tann dagin undir Kósini, og fólk av landi arbeiddi upp á motorin. Teir vóru bidnir um at leggja seg við teym úti á vánni – hetta var beint út fyri "Olafsa brúgv", og har var "Silva" eisini sett á land – tí hildið var, at skipini vóru álopsmál, og eitt nýtt ísvirkið var júst bygt á Kósini.

Álopi hendið um hálvgum tveytíðina.

Teir, sum arbeiddu upp á motorin komu ikki umborð dagin eftir, og Klaksvíkin var so at siga fólkatóm tann dagin.

Ikki fyrr enn skipið var á landi og pumpað lens, var bumban uppdagað. Maskinrúmið var fult av sjógvi, men skottið fram til lastina helt tætt.

**Fóru at sigla fyri hersetingarvaldið**

Eftir hesa hending fór skipið at sigla runt í Føroyum fyri bretska hersetingarvaldið, soleiðis sum "Juvel" eisini gjørdi, hesum greiddu vit frá í næstseinasta blaði.

Skipari á "Silvu" var Bertel Kristian Landmark, sum var føddur 24. juli 1882 í Ulstein í Noregi. Landmark doyði á Landssjúkrahúsinum í Havn beint eftir krígslok.

Johannes letur sera væl at skiparanum, sum var komin væl til árs tá. Hann var sera góður við manningina. Hann var ógiftur, so hann hevði ikki trupulleikan, sum nógvir aðrir høvdu, at hugsa um konu og børn heima í Noregi.

Tá var tað øðrvísi við stýrimanninum Mons Stormark. Hann nívdist nógv av, at hansara familja var í



*"Silva" á vánni í Havn.*



*Manningin á "Silvu". Aftanfyri eru f.v.: Petur Jakku av Sandi, Siggert úr Havn, suðuroyingur, Jóhannes Henriksen og Petur Heimá. Menninir fremst á myndini eru bretar.*

Framhald á næstu síðu

Noregi. Hann plagdi at skemta við Johannes um at koma við til Noregs eftir familjuni, afturfyri skuldi hann fáa yngstu dóttrina!

Men einaferð so frættir Stormark, at kona og børn vóru komin til Hetlands. Tá lá væl fyri hjá honum at fara hagar, hann fór 12. okt. 1941 við "Polarstjørnuni 1" til Hetlands.

Kjell Ervik fór við sum stýrimaður í staðin. Í aðrari grein hava vit greitt frá, hvussu hann og Lisa vóru gift í ein skund, áðrenn tey fóru úr Noregi, og vit hava eisini søguna um fyrsta barnið hjá teimum báðum, sum doyði og liggur jarðað í kirkjugarðinum í Havn.

Í 1944 fór Johannes av "Silvu", tí hann skuldi giftast. Tað næsta vit vita um "Silvu" er, at teir vóru í Orknoyggjunum í august 1944, og tá sigldu teir millum Scapaflow og Aberdeen vegna norska flotan. Sum kunnugt var Scapaflow í Orknoyggjunum ein tann týdningarmesta flotastøðin hjá bretum, bæði undir 1. og 2.heimsbardaga. Ein slík støð er sjálvsagt eitt upplagt bumbumál hjá einum fígginda. Ein týskur kavbátur slapp eisini inn her í 1939, og tað eydnaðist at søkkja slagskipið hjá bretum "Royal Oak".

Kjell Ervik var eisini við "Silvu" í hesi siglingini. Johannes greiðir frá, at hann seinni fór við "Vesturvarða", og einaferð teir vóru í Aberdeen og landaðu, hitti hann Kjell, sum framvegis var við "Silvu".

### "Verden er liten"

Johannes greiðir frá eini aðrari hending, sum er partur av hesi søgu. Sum 18 ára gamal var Johannes í 1936 við "Research" uppi við Bjarnoynna. Her var hann eisini á landi og vitjaði teir 4 telegrafistarnar sum hildu til her. Teir gjørdu tveir túrar, og fyrra túrin landaðu teir til ein dampara í Ný Ålesund á Svalbard. Her inni lógu eisini nakrir norskir kópafangarar. Veðrið var gott, so eitt kvøldið fóru Johannes og ein annar við báti umborð á ein kópafangara. Her vóru teir sera blíðir, og føroyingarnir vórðu vístir runt. Johannes minnist eisini at ein maður stóð uppi á brúnni.

Fleiri ár seinni umborð á "Silvu" fortelur Johannes skiparanum Landmark frá hesum tilburði. Tá hyggur hann upp og sigur: "Verden er liten, det var jeg som var skipper!"

### Hittu dótrina sum honum var lovað

Johannes greiðir frá eini stuttligari hending, tá hann og konan Brynhild í 1980 vóru í Tromsø í Noregi á eini heimavirkisferð, har uppgávan hjá Johannes var at spinna fyri norðmonnum. Tá ferðalagið var í Bergen á veg heimaftur fór Johannes at leita í telefonbókini fyri at vita, um hann kundi finna stýrimanninum, Mons Stormark, tí hann visti, at Stormark var ættaður av eini oyggj, Fedje, har á leiðini. Tað gjørdi hann ikki, men hann fann fleiri, sum høvdu sama eftirnavn. Hann fór so at ringja til øll hesi, og tá hann kom til tað seinasta navnið, fekk hann fatur í einum soni hjá stýrimannin. Júst tá høvdu tey eina familjufest, og tey skipaðu fyri at heinta Johannes og Brynhild, og her vóru tey sera væl móttikin. Mons Stormark sjálvur varð deyður, men her hitti Johannes dóttrina, sum honum varð lovað. Men tá var tað ov seint hjá báðum!

Annars hevur Johannes eisini siglt nógv aftaná bardagan. Hann fór við "Henry Freeman", sum var ein slupp. Hann hevur eisini verið við í línubátatíðini. Fyrst við "Tungufossi" og síðan við "Reynsatindi". Her kom hann til skaða og gavst at sigla. Síðan arbeiddi hann sum skúlatænari í Sørvági.

Konan Brynhild, sum var ættað av Húsum, doyði fyri nøkrum árum síðani.



*Menninir sum arbeiddu við at umvæla skaðan á "Silvu". Frá vinstru eru teir: úr Hósvík, Elias úr Noreg, ikki kendur, Havnamaður í Rættará, Jóhannes Henriksen, Jógvan, pápi Simma, sonur Wenzel Petersen.*



*"Silva" á beding á skipasmiðjuni í Havn. Her er skaðin frá bumbuni umvældur.*

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Skrivari til Løgmansskrivstovuna

Í sambandi við, at skrivari á Uttanríkisdeildini fer í barnsburðarfarloyvi, verður við hesum søkt eftir avloysara í tíðarskeiðnum 2. august 2004 til 1. apríl 2005. Fleiri upplýsingar um starvið eru at finna á www.tinganes.fo.

# Úr Dimmalætting



**BUMBAN Í NORSKA BÁTINUM "SILVA".** Millum lesarabrøvini í seinastu Dimmalætting var ein sera áhugaverd frágreiðing um bumbuálopið í Klaksvík í 1941, skrivað av Petur Heimá, sum var við norska skipinum "Silva" og sá, tá ið bumban var tveitt. – Myndina hevur Robert Brockie jr. úr Havn tikið, tá álopið var gjørt, og sýnir hon bumbuna í maskinrúminum á "Silvu", aftaná at hon var komin inn gjøgnum skipssíðuna, hevði brotið ljósmotorin, var farin upp um høvuðsmotorin, har toppstykkið var tikið av, og hevði lagt seg á dúrkið. Bumban, sum hevði tíðarur, var ikki brostin, av tí at urverkið var irrað.





**BUMBINGIN AV KLAKSVÍK.** Í sambandi við umrøðu av bumbuálopunum á Klaksvík undir seinna heimsbardaga, høvdu vit í seinasta blaði mynd av eini bumbu í maskinrúminum á norska bátinum "Silva". Hesar báðar myndirnar hava vit fingið aftrat. Tær eru tiknar av H. Hansen, táverandi sýslumanni í Klaksvík, við myndatóli hjá Poul Als, fyristøðumanni. Ovara myndin er frá fyrsta bumbuálopinum á Klaksvík um 9.-10. oktober 1941. Eitt týskt flogfar tveitti tvær bumbur, sum komu í fundamentið á kaiini, sum fór so illa, at sund gjørdist í hana. Fugloy, sum lá við bryggju, sakk, men hon varð seinni hevað við tunnum og síðan tikin upp á beding og umvæld. – Hin myndin er tikin, tá ið "Silva" er komin upp á sleipistøð og vísir holið, bumban gjørdi í bakborð, tá ið hon fór gjøgnum síðuna og inn í maskinrúmið uttan at bresta. Maðurin á myndini er gamli bedingsmeistarin, Peter Joensen, sáli.

Myndin á forsíðuni av "Silvu" er málað av Hans Hansen úr Mikladali.

*Framhald á síðu 15*

# Manningin á "Kongshavn" møttist aftur



Skiparin Jacob Højgaard heilsar uppá sína gomlu manning.



*Sitandi fremst f.v.: Johan Olsen, Gøtugjógv, Jacob Højgaard, Toftir, Salomon Johannesen, Hellurnar, Hendrik Poulsen, Toftir, Jørgen Gleðisheygg.*

*Standandi f.v.: Hans Jacob Jensen, Hellurnar, Hans Andreas Poulsen, Toftir, Ásmund Dahl, Oyri, Jákup Næss Joensen, Hvalba, Eingrim Holm, Hvalba, Eli Jensen, Hellurnar, Ellintur Abrahamsen, Fuglafjørð (aftanfyri), Hjartvard Thomsen, Hvalba, Jógvan Rasmussen, Oyndarfjørð, Mortan Vang, Hvalba (aftanfyri), Jacob Willumsen, Hvalba, Jóannes Nielsen, Tórshavn, Egin Midjord, Argir, Petur Jacobsen, Hvalba. (aftanfyri), Jens Christian Hentze, Hvalba. (aftanfyri), Walther Løjhøjten, Toftir, Kjartan Poulsen, Toftir, Hans O. Højgaard, Tórshavn (aftanfyri), Bjarni Dalsgarð, Argir.*



*Nógv er at práta um eftir so nógv ár. F.v. Ellintur, Jákup og Jóannes.*



*"Minnist tú....?" Frá vinstru Ellintur, Johan, "Beiggin" og Henrik.*



*Her hittir kokkurin, tann skjótt 90 ára gamli Salli, uppá sín gamla kokkadrong Egin.*



*Tað varð eisini sungið nógv, og minti hetta um sunnudagarnar umborð, tá hildið varð heilagt.*

# Myndirnar úr Moskva

Í seinasta blað høvdu vit eina frágreiðing um fiskarímessuna í Moskva. Av misgávum lógu myndirnar eftir. Nú koma tær.



Útsýni frá Hotel Cosmos, har føroyingarnir búðu í Moskva.



Russiskt sjónvarp hevur samrøðu við Árna Dam, konsul.



Føroyskir kappingarneytar samstarva í Moskva.

# Føroyingar á Sjómatarframsýning í Brússel



Høll 5 á ESE í Brússel, har føroyski landabásurin er.



Básurin hjá United Seafood.



Snøggi básurin hjá JFK, har sjónvarp vísur ein vælumtóktan reklamufilm.

Sjómatarframsýningin, European Seafood Exposition, var aftur í ár í Brússel fyst í mai, har fleiri føroyskar fyritøkur vóru við. Bæði sum framsýnarar og sum vitjandi.

Fyri fleiri av fyritøkunum er afturvendandi túrurin til Brússel eitt frálíkt høvi at røkja kundasambond. Keyparar úr øllum heiminum koma til Brússel, og hóast heimurin er stórur, so er hann kanska ikki so stórur júst innan hesa vinnugrein. Fyritøkurnar nýttu høvi at hjúkla um kundar sínar eisini um kvøldarnar, tá farið var út at eta

Á føroyska landabásinum, sum Petur & Petur hevði sniðgivið og sett upp, luttóku hesar fyritøkur:

JFK-group
Fram
Landshandilin
PRG-Export
Farex
Faroe Seafood
Bergfrost
Nevið
Smyril-Line
North Atlantic Fish Fair
Faroe Islands Business News
Skipafelagið Føroyar
United Seafood
Menningarstovan

Aðrastaðni á framsýningini kundi ein finna básar við ma. Kaupthing, Eimskip, SNG og FJM við føroyskari manning.

Tað tyktist sum færri vitjandi vóru á framsýningini í ár enn undanfarin ár. Allíkavæl søgdu allar føroysku fyritøkurnar, sum luttóku á landabásinum, at tær vóru stak væl nøgdar við framsýningina, tí hóast færri vitjandi, so vóru tey meiri seriøs enn vanligt.

Eitt serligt listarligt tiltak var á føroyska landabásinum í ár. Fyri at skapa áhuga fyri føroyska básinum, so skipaði Petur & Petur fyri, at listamálarin Kári Svennson hevði listaframsýning og stóð og málaði ein málning á framsýningini. Hetta var sera forvitnisligt, og nógv fólk steðgaðu á. Tá framsýningin var at enda komin var málningurin lutaður burtur. Glaði vinnarin var ein kvinna, sum starvast í norsku fyritøkuni "Færingen", so tað kundi ikki hóska betur.

Føroysku fyritøkurnar bjóðaðu seg fram á framsýningini og fyri samlaða tiltakið og básin sum heild vóru nógv rósandi orð frá vitjandi og okkara kappingarneytum í londunum rundan um okkum.

*Framhald niðast á næstu síðu*

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



Bjargaðu russararnir:

# Kensluborin sameining

**Vit hava fyrr greitt frá í FF-blaðnum, at tað í longri tíð hevur verið arbeitt við at fáa teir russararnar, sum komu frá tí við lívinum í 1982, tá russiska bingjuskipið "Mechanik Tarassov" sakk og "Sigurfarið" bjargaði manningini, at koma aftur higar á vitjan. Av manningini komu 5 mans frá vanlukkuni við lívinum.**

Mikkjal Olsen var skipari á "Sigurfarinum". Kona hansara Hanna hevur í longri tíð arbeitt við eini ætlan um at fáa teir bjargaðu russararnar við húski at koma til Føroyar, har báðar manningarnar kundu hittast og minnast ta hendingina, sum bindur teir saman. Ætlanin var, at hetta skuldi vera í 2002, tí tá vórðu 20 ár liðin síðani hendingina. Men tá lá tað ikki fyri.

Men nú eydnaðist tað so. Tann 12. mai kom eitt ferðalag við 7 fólkum til Føroya. Í ferðalagnum vóru stýrimaðurin Slava saman við konuni, 2. meistarin, Alexander, saman við konu, dóttir og abbadóttir, og afturat teimum var eisini einkjan eftir læknan umborð. Høvuðsendamálið við ferðini var at hitta manningina á "Sigurfarinum", sum tey kunnu takka fyri lívið. Onkur av teimum, sum bjargaðist tá, er farin og onkur er blivin ov gamal til eina slíka ferð.

Hetta var ein sera forkunnug vitjan. Ferðalagið steðgaði í Føroyum í knappa viku, og teimum varð vístur tað gestablídni, sum nú einaferð kann vísast. Seinasta leygarkvøld bjóðaði Klaksvíkar Býráð til ein døgurða saman við manningini á "Sigurfarinum". Hósdagin var ferðalagið ein túr í Havn, har tey sóu alt tað, sum er vert at síggja í høvuðstaðnum. M.a. vitjaðu tey á russiska konsulátinum, har Árni Dam tók ímóti teimum.

Aftaná varð vitjað í fiskimálaráðnum, har fiskimálaráðharrin Bjørn Kalsø tók í móti. Bjørn bjóðaði teimum vælkomnum, ikki minst havandi í huganum orsøkina til, hví tey vóru her. Hóast Bjørn var blaðungur í 1982, tá alt hetta fór fram, so var hetta ein so dramatisk hending, at hon enn stendur fast í minni hansara. Hann hevur so seinni fingið tað beinleiðis samband við hesa hendingina, at kona hansara er systirdóttir Mikkjal, skiparan á "Sigurfarinum".

Ferðalagið takkaðu eisini fyri móttøkuna og fyri, at føroyingar veruliga eiga lívið í teimum. Henda løtan var sera kensluborin, ikki minst tá kona meistaran við tárum í eygunum takkaði fyri, at hon hevði fingið mannin aftur á lívi.

Áðrenn ferðalagið fór aftur til Klaksvíkar, bjóðaði Føroya Fiskimannafelag til døgurða á Sjómansheiminum.

Vit fara í komandi blað at siga meira frá hesi vitjan og frá samkomuni, har manningin á "Sigurfarinum" eisini var við.



*Inni á russiska konsulátinum. F.v. Ivan, tolkur, Árni Dam, Slava, stýrmaður á "Mechanik Tarassov", Mikkjal og Hanna.*



*Bjørn bjóðar gestunum vælkomnum. F.v.: Mikkjal Olsen, skipari, Bjørn, Ivan Moskalenko, tolkur, og Hanna, kona skiparan.*



*Bjørn saman við russisku gestunum.*



*Slava takkar fyri lívið.*




*Básurin hjá Faroe Ship í Brússel.*



*Finnur og Niclas frá Landshandlinum.*

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein



**Dýra biðidag, 7. mai,** vóru tað 5,8 hitastig og sirm, og tað hava vit brúk fyri. Farna vikan hevur verið ófør til veður við so at siga stilli hvønn dag. Várið er fyri durunum, tí mín erfaring er, at tá kavaspurvarnir koma, tá er várið í nánd, men veðrið er ikki, sum tað var fyrr, so alt kann broytast.

"Helena L" hevur verið á royndarveiði í Suðurgrønlandi fyri Royal Greenland og Naturinstituttet, sum tað nú einaferð eitur, og heimastýrið, men einki bar til, har var so at siga svart fyri krabba. 100 punkt vórðu ávíst, hvar roynast skuldi, og 5-6 vikur avsettar til royndarveiðina, men teir góvust longu eftir 16 døgum, og tá høvdu teir roynt á 79 ásettum punktum.

Tað bleiv ov nógvur ísur í Breiðafjørðinum (Sermisutsaqat) og við Nanortalik og suður til Kappan. Teir drógu 2000 teinar og fingu 441 kg – ella 0,2 kg uppá teinin. Onkur meinar, at sjógvurin er ov kaldur, so krabbin hevur longri tíð at búnast. Tað hevur verið krabbi at fáa har áður.

Áðrenn teir fóru á royndarveiði, drógu teir teinarnar upp, sum stóðu í Godthåbsdýpinum, og tað gav 8.811 kg á 783 teinum – ella í miðal 11,25 kg uppá teinin, sum má sigast vera óført fiskarí.

Smærru rækjubátarnir fáa væl av rækjum; teir royna út fyri Agto, og onkur hevur gjørt tveir túrar uppá vikuna og er komin upp á 100 tons. Støðdin á rækjunum kundi verið væl betri, og onkur av teimum roynir so at siga bert at taka stórar og góðar rækjur, og tað gevur eisini væl betri prís – upp ímóti 9 kr. kg, meðan aðrir liggja millum 6-7 kr. kg.

**6. mai** kom ein nýggjur (gamal) trolari í flotan. Tað er gamli "Sartleq", sum er keyptur úr Íslandi. Tað er Royal Greenland, sum stendur aftanfyri, og trolarin eitur "Hansaraq" og skal fiska rækjur til virkini á landi. Eg tosaði við skiparan um, hvat teir roknaðu við at skipið kundi lasta av ísaðum rækjum, og hann roknaði við umleið 100 tonsum av ísaðum rækjum í kørum. Teir skulu eisini brúka kør, sum "Lómur" brúkar, og har koyra teir umleið 220-225 kg í hvørt karið. "Hanseraq" fór avstað, tá teir høvdu tikið um 200 kør umborð, og teir høvdu líka nógv umborð, nú teir komu.

Tann **9. mai** vóru +3,3 stig og stilli inni á, men eitt lot úti á av norðri. "Nanok Trawl" kom inn at landa, og teir høvdu knapt 470 tons inni. Hetta er ein stuttur túrur, tí teir fóru út tann 17. apríl, og teir siga, at slagið er brúkiligt.

"Lómur" kom eisini inn, tí teir høvdu trupulleikar við girinum. Teir rokna við at skula liggja í nakrar dagar og umvæla. Teir komu úr Illulisat, har teir høvdu landað 70 tons av ísaðum rækjum.

**11. mai:** +5,3 stig og stilli. "Nanok Trawl" fór nýggjan túr. "Sattuaq I" kom inn at landa livandi krabba í gjár; teir høvdu 34 tons inni og høvdu drigið 3000 teinar, og tað gevur 11,3 kg uppá teinin – óført!

"Sattuaq II" er á veg higar at landa, og teir hava aftur gjørt ein roktúr. Teir byrjaðu fiskiskap tann 5. mai og góvust tann 10. mai og hava 50,6 tons inni. Teir hava drigið 3.745 teinar og tað gevur 13,5 kg uppá teinin, sum má sigast at vera óført fiskarí. Hetta er tað mesta, eg higartil veit, sum er komið upp á land av livandi krabba ein túr.

Tað hevur verið heilt gott veður eina tíð, og tað hevur gjørt, at nakað av moldini í garðinum hjá mær er tiðnað so mikið, at eg havi sett nakað av eplum niður. Tøðið hesaferð er væl modnaðar rækjur, og teir, sum kenna rákan av slíkum, vita væl, hvussu tað luktar. Nú er bert at vóna, at nakað kemur upp aftur av eplum. Eg havi eitt lítið stykki eftir, sum eg kann seta niður í, men har er frostur í enn, so tað má bíða nakað enn.

Tann **12. mai** vóru minus 1,8 stig og stilli. Nú komu tíðindi úr Nanortalik, at "Bjal Fighter" hevur landað ta størstu mongdina av livandi karbba til virkið hjá Royal Greenland har suðuri. Teir høvdu gott 60 tons íalt, og tað gav 14,5 tons uppá teinin. "Bjal Fighter" hevur landað tveir túrar tilsamans 90 tons, og "Sattuaq II" hevur lagt gott 90 tons upp eftir tveimum túrum. Tað sær út til, at nóg mikið er til av krabba, har teir royna fyri tíðina. 5 skip fiska har suðuri, og tey eru "Sattuaq I", "Sattuaq II", "Helena L", "Bjal Fighter" og "Bjal Opeliu", og tað eru føroyingar við øllum hesum skipunum.

Tað hevur annars verið eitt lítið prískríggj ímillum Royal Greenland og tað privata virkið her, Sisimiut Food, um rognkelsisrogn. Royal Greenland er komið upp á 25 kr. kg, og teir privatu geva 23 kr. kg; men tað er ein fyrimunur hjá teimum, sum landa til tað privata virkið, at teir sleppa at avreiða tosk til ein russiskan trolara, sum kemur higar um stutta tíð. Royal Greenland fer ikki at taka ímóti toski; teir skulu bara hugsa um rækjur og krabba og so tær tríggjar tunnunar av rogni, sum teir hava tikið ímóti her í Sisimiut inntil í gjár. Tað sigst, at russarin fór at sigla hendanvegin úr New Foundlandi í gjár. Avreiðingarprísurin fyri tosk við høvdi er 6 kr. kg, og tað er fyri allar støddir.

**13. mai** vóru +0,4 stig og stilli. Hasin nýggji rækjutrolarin, "Hansaraq", kom inn av fyrsta túri. Teir høvdu royndarkoyrt alt umborð og høvdu gott 40 tons av ísaðum rækjum í kørum.




# Ævig vinabond millum norðmenn og føroyingar

**Tær mest áhugaverdu avleiðingingarnar av herðmenn flýggjaðu til Føroyar undir krígnum, eru tey vinabond, sum vórðu knýtt tá, og sum enn í dag eru tey somu.**



*Nýgiftu Kjell og Lisa Ervik komu at búgva hjá Jóhonnu Sofíu og Erik Lassen, har tey eisini komu í brúðarsong. Hetta var byrjanin á tí vinskapi, sum framvegis er millum eftirkomararnar hjá teimum.*

Ranvá Hansen, f. Lassen, er ein av føroyingunum, sum hevur størstan kunnleika um søguna um norðmenninar, sum komu til Føroyar í 1940. Rannvá er fødd í 1933 og var tí umleið 7 ára gomul, tá norðmenninir komu til Klaksvíkar og gjørdust ein partur av hennara lívi. Foreldur hennara vóru Johanna Sofía og Erik Lassen. Kjell Ervik og kona hansara Lisa komu at búgva hjá teimum. Kjell átti 5 aðrar brøður, sum eisini komu til Føroyar tá, og við konum og børnum komu 14 fólk av Ervikættini til Føroyar. Rannvá kom náttúrliga at kenna tey øll somul væl og tískil gjørdust hesi fólk ein partur av hennara uppvøkstri.

Rannvá luttók eisini í sjónvarpssendingunum hjá Helga Jacobsen. Vit hava hitt hana og mannin Jóan Jakku á máli. Rannvá dugur væl at greiða frá, og hon hevur eisini fingið frásøgn frá norðmonnunum um, hvussu umstøðurnar vóru í Noregi, áðrenn tey flýddu til Føroyar.

Høvuðsnøvnini í hennara upplivingum eru ættirnar Ervik og Kragset.

### Kríggj og kærleiki bróta allar lógir

Í seinasta blaði greiddu vit frá umstøðunum, tá "Juvel" fór avstað úr Noregi. Men Rannvá kann greiða frá øðrum viðurskiftum í hesum sambandi. Sum nevnt var Kjell ein av Ervik brøðrunum. Hann var trúlovaður við Lisu, sum arbeiddi í handlinum hjá Jonas Kragset. Tá avgerðin um at rýma varð tikin, mátti gerast skjótt av. Kjell vildi fegin giftast, áðrenn tey fóru avstað. Kjell fór inn í handilin, har Lisa arbeiddi at siga henni frá, at nú máttu tey fara sum skjótast, men at tey skuldi giftast áðrenn tey fóru. Tey fóru beinanvegin til prestin og Jonas Kragset fór við teimum. Presturin segði teimum, at hetta kundi ikki lata seg gera, um gingið varð eftir reglunum. Vanliga skal ein tíðarfreist til, áðrenn eitt par kann vera gift og høvdu tey nógvan skund, so skulu tey havt útvega sær eitt kongabræv, men tað høvdu tey ikki. – Prestur gjørdi tí eitt undantak, tí sum hann segði, so bróta kríggj og kærleiki allar lógir. Og gift blivu tey.

### Sá fyrstu ferð konufólk í langum buksum

Tá "Juvel" var komin til Klaksvíkar, varð farið í holt við at skaffa fólkunum innivist. Mammubeiggi Rannvá, sum var politistur, kom inn til teirra og spurdi, um tey ikki kundu hýsa einum nýgiftum pari, og hetta var gamaní. Kjell og Lisa sluppu tískil ikki í brúðarsong, fyrr enn tey vóru í Klaksvík, og mamma Rannvá keypti Lisu náttkjólan, hon var í seinkaðu "brúðarnáttina".

Rannvá minnist, at tá hon seinni var við foreldrunum niðri á keiuni at hyggja eftir skipinum, sá hon fyri fyrstu ferð konufólk í langum buksum.

Kjell og Lisa búðu í Klaksvík eitt lítið ár, so fluttu tey til Havnar, tí Kjell skuldi fara á stýrimansskúla: Tey búðu á leið har, sum Keypsamtøkan í miðbýnum er í dag og vóru búgvandi har restina av tíðini, tey vóru í Føroyum.

Tey upplivdu ta stóru sorg at missa sítt fyrsta barn. Sonur teirra, Trygvi, doyði, tá hann bert var 2 mánaðir gamal. Tey hildu, at hann varð smittaður við menigitis av onkrum eingilskmanni. Trygvi varð jarðaður í Havn, og Rannvá hevur enn gravsangirnar, sum vit prenta ein part av í hesi grein.

### Einki samband heim

Annars var tað soleiðis, at hjá Ervik beiggjunum vóru foreldrini, ein beiggi og tvær systrar eftir í Noregi. Samband var einki millum londini. Her var støðan tann sama sum millum Danmark og Føroyar. Tey, sum sótu eftir í Noregi, høvdu ongan møguleika at frætta, hvussu tað hevði gingið hjá teimum, sum vóru farin avstað. Tað átti at borið til at givið boð við Reyða Kross brøvum, men hetta riggaði ongantíð í hesum førinum.

Støðan í Noregi var eisini tann, eins og í hinum hersettu londunum, at tað var forboðið at lurta í radio eftir øðrum enn teimum almennu tíðindunum frá týsktstýrdu fjølmiðlunum, og hesi tíðindi vóru ikki altíð so eftirfarandi.

Týskarar høvdu tó varhugan av, at forboðsreglurnar um lurting vórðu brotnar á Kvamsøy, har Ervik ættin búði, tí tað vísti seg, at fólk har á leiðini vóru betri orienterað og vistu meiri um støðuna í krígnum enn fólk annars.

Gamli Ervik átti nevniliga eitt radiotól, sum hann nýtti til at lurta eftir tíðindum úr Londum. Hesi tíðindi vóru meira eftirfarandi enn tey almennu tíðindini. Í einum úthúsi hevði hann skorið eitt hol í veggin, har hann setti radio inn í. Tey skiftust so um at lurta eftir tíðindunum, og tá ikki var lurtað hongdu tey eitt málarí fyri. Tá farið varð at lurta mátti onkur ansa eftir, at einki fólk kom har í nánd.

So hendi tað ein dagin, at pápin kemur gleðistrálandi til hús. Nú hevði hann hoyrt lívstekn frá synunum. Hann hevði nevniliga hoyrt í ensku tíðindasendingini, at seks




*Her liggur lítli Trygve Ervik á kirkjugarðinum í Havn.*



TRYGVE ERVIK

F. 16. DESEMBER [illegible]
D. 28. FEBRUAR [illegible]

*Rannvá hevur varðveitt gravsangirnar hjá lítla Trygve Ervik. Her síggja vit firsíðuna.*



I KAPELLET

Stille, stille, se hvor søtt
lille Trygve sover.
Lyset gjennem mulmet brøt,
nu er smerten over.
Tyss, det var som noget klang.
Var det engles jubelsang?

Mama, hvorfor graater du?
Lille Trygve sover.
Frisk og glad han svever nu
jorden høit henover.
I det hjem med evig fred
hvor ei gledens sol gaar ned.

Stille, pappa, stille nu
medens Trygve sover.
Vær ei mer saa mørk i hu.
Husk at Gud er over.
Send dit blikk til Almakts fot
Herrens vei er altid god.

Stille, stille, se hvor søtt
lille Trygve sover.
Han som gravens lænker brøt
evig gjensyn lover.
Se dog op mot himmelen
hvor ditt barn er vandret hen.

*Yrktur var ein serligur sangur til "lille Trygve".*

Framhald á næstu síðu

norskir brøður høvdu givið eina gávu til ein norskan grunn í London. Og tað kundi neyvan vera nakar annar enn tey, sum áttu seks synir, sum vóru flýddir undan týskarunum. Hetta var tað fyrsta lívsteknið tey fingu frá teimum í tvey ár.

### Sá mammu sína frá kavbátinum

Ein av beiggjunum sá tó eina ferð mammu sína. Hann var við einum enskum kavbáti, sum virkaði við Noregsstrondina. Eina ferð vóru teir so nær við heimbygdina, at teir royndu at lúra so nær teir tordu. Tá sá hesin sonurin í periskopinum mammuna ganga í túninum og geva hønunum. Hann tordi tó ikki at koma nærri.

### Sambandið stóð við

Aftaná kríggið fóru so at siga allir norðmenninir heimaftur, men sambandið varð hildið við líka og væl tað. Hetta var ikki minst galdandi fyri Rannvá. Hon fór til Noregs eina tíð at arbeiða hjá Lisu og Kjell, tá tey skuldu hava eitt barn afturat, og maður hennara Jóan Jakku sigldi í 1956 við "Smaragd" hjá Ervik reiðarínum á sildaveiðu við snurpinót. Rannvá var eisini við eina ferð. Hon og ein systur hjá Ervik brøðrunum vóru umborð í tríggjar dagar, men fingu tey ikki livandi, og hetta varð roknað sum ein váttan um, at tað hevði óeydnu við sær at hava konufólk umborð á skipi! So tað mundi vera frægast at fara í land aftur.

Sambandið varð hildið viðlíka á tann hátt, at eftir kríggið vóru Ervik brøðurnir á saltfiskaveiðu við Grønland. Teir gjørdu tveir túrur árliga, og fóru tískil framvið Føroyum fýra ferðir aftur og fram. Hvørja ferð løgdu teir at í Klaksvík fyri at heilsa upp á sínar vinir. Tað gjørdi ongan mun, um tað var dagur ella nátt. Teir vóru líka vælkomnir. Og teir høvdu altíð okkurt góðgæti við sær. Rannvá minnist tey leskiligu berini, teir plagdu at hava við sær úr Noregi, og tá teir komu frá fiskarí høvdu teir fult av døgurðamati við til teirra.

Eina ferð høvdu teir ein stóran leikutoysbil við til sonin hjá Rannvá. Bilurin var so stórur, at hann kundi sita í honum. Sonurin hjá Rannvá er føddur í 1960, og tá vóru longu nógv ár verið liðin, síðani teir vóru farnir heimaftur, men teir høvdu kortini ikki gloymt, hvussu gott teir høvdu havt tað í Føroyum.

Fyrsti tíðina aftaná kríggið var avmarkað hvat man kundi keypa í Noregi. Men í Føroyum var nóg mikið at fáa. So her lá væl fyri at keypa inn undir seg!

Tað kom eisini fyri, at føroyingar fóru við til Noregs sum ferðafólk. Onkur helt fyri við Rasmus, at teir máttu tikið eitt sindur fyri tað. Men tað var ikki talan um. Teir høvdu havt tað so gott í Føroyum, at hetta var tað minsta teir kundu gera afturfyri alt tað góða, teir høvdu notið í Føroyum.

Rasmus var annars tann avgjørdi leiðarin hjá ættini. Tað var hann, sum var skiparin. Og hann hevði ein serstakan autoritet. Rasmus bríggjaði seg ikki um royking, meðan fleiri av beiggjunum royktu. Men høvdu teir fest sær í og Rasmus var í farvatninum, vóru teir skjótir at sløkkja, hóast teir vóru vaksnir menn.

Nú eru allir teir upprunaligu Ervik beiggjarnir deyðir. Men Rannvá hevur framvegis samband við eftirkomararnar, sum eisini javnan vitja í Føroyum. Per Egil, sonur Karl Ervik, kemur til Føroya í summar í "klassaball" hjá sínum skúlaflokki í Klaksvík.

Ervik Marine er eitt stórt reiðarí. Teir hava havt fleiri fiskiskip, og teir eru eisini við í oljuvinnuni, so talan er um eina rættiliga stóra fyritøku.

Rannvá kendi eisini væl Esther og Wilhelm. Hennara samband við tey er, at svágur hennara Erik giftist við Ásu, sum var dóttirin í húsunum, har Esther kom at búgva. Hon ber teimum alt gott. Um Wilhelm sigur Rannvá, at hann var so smæðin, at hann næstan vildi umbera, at hann var til. Hann var stak fittur, og tá tey komu at kenna hann, minnast tey hann at hava havt "klebihjerna". Hetta er eisini tað sum hansara næstringar í Føroyum bera honum. Wilhelm arbeiddi annars hjá Ervik reiðarínum.

Er tað onkur, sum kann greiða meira frá søguni um norðmenninar undir krígnum, vilja vit fegin frætta.



*Norsk jarðarferð í Havn undir krígnum.*



*Rannvá og Jóan Jakku Hansen. Rannvá f. Lassen greiddi í sendingunum hjá Helga Jacobsen frá sínum kennskapi til eftirkomararnar hjá Ervik ættini. Hon hevur eisini samband við Kragset ættina, sum somuleiðis er partur av hesi søgu. Jóan Jakku hevur eisini siglt við "Smaragd" hjá Ervik reiðarínum.*



*Nógvir føroyingar hava verið við "Smaragd"*

# Røðin um norðmenn undir krígnum

Røðin um norðmenn sum komu higar undir krígnum gerst drúgvari enn ætlað. Hetta er sjálvsagt eitt stórt øki, og tá eitt slíkt evni verður tikið upp, kemur altíð meira undan kavi.

Tískil hava vit í dag 3. partin í hesi røð. Vit hava tilfar til eina part afturat, men hesa ferð koma vit at leypa eitt blað um, tí vit skulu hava tilfar úr Noregi. Men tá kemur parturin lutvíst at snúgva seg um Ole Solbjørg og hansara skip "Utvær", Eldøy og "Gå På" og lutvíst um "Disko" og Hildremyr ættina, sum kom higar við hesum skipi. Um nakar veit meira um hesi skip og teirra manningar vilja vit fegin frætta.

Í komandi blað kemur siðsøguligi parturin at snúgva seg um fiskimannafelagsformannin Hans Jacob Havstreym, sum hevði verið júst 100 ár nú, um hann hevði livað. Men tíverri gjørdist hann bert 28 ára gamal og varð bert formaður í tveir mánaðar.



*Juvel á eini av sínum mongu ferðum til Klaksvíkar.*

# Frágreiðingin um støðuna hjá rækjuflotanum

### Marknaður fyri kaltvatnsrækjur

Marknaðurin fyri kaltvatnsrækjur kann býtast upp eftir pilkaðum rækjum og rækjum við skel (skalrækjum). Hann kann eisini býtast eftir støðd av rækjum. Størstu rárækjurnar fara til Japans. Miðalstøddirnar verða kókaðar og fara einamest til Frankaríki, Svøríki, Kina og Russlands. Tær minstu støddirnar vera pilkaðar á pilkivirkjum í veiðilondunum og verða síðan seldar á marknaðin – eina mest til Stórabretlands.

### Pilkaðar rækjur

Í talvu 6 er býtið av søluni av pilkaðum rækjum fyri árið 2003 víst.

Talva 6 vísir, at Stórabretland er nógv tann størsti marknaðurin fyri pilkaðar rækjur. Síðani koma danski og amerikanski marknaðurin, sum eru ávikavist 17 og 12%. Talan er helst um eina yvirmeting av danska marknaðinum, tí hetta er neyvan tað, sum verður nýtt av rækjum í Danmark. Ein partur verður mest sannlíkt seldur víðari. USA er 12% og næstan alt kemur úr Kanada. Svøríki er eisini ein stórur marknaður. Har er Norra nógv tann størsti útvegarin. Ísland er størsti útflytari til Stórabretlands og hevur væl meira enn helvtina av marknaðinum. Føroyar hava áleið 6% av marknaðinum í Stórabretlandi, meðan Grønland og Norra hava tað dupulta. Størstu framleiðarar av pilkaðum rækjum eru Ísland og Kanada. Síðani koma Norra og Grønland.

Ein orsøk til, at Ísland hevur so mikið stóran marknaðarpart í Bretlandi er, at Ísland hevur fría marknaðaratgongd til ES. Sjálvt um Kanada er ein stórur framleiðari, hevur Kanada lítlan marknaðarpart í Stórabretlandi. Orsøkin er, at Kanada skal gjalda 6% í tolli fyri tey fyrstu 5.000 tonsini og síðani 20% fyri alt sum er omanfyri 5.000 tons.

Talva 6. Býtið av søluni av pilkaðum rækjum 2003

| | Kanada | Føroyar | Ísland | Norra | Royal Greenland | Tilsamans | Býtið |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stórabretland | 2.544 | 2.200 | 19.200 | 4.500 | 4.500 | 32.944 | 40% |
| Danmark | 4.242 | 390 | 3.300 | 1.800 | 4.000 | 13.732 | 17% |
| Týskland | 404 | 60 | 1.500 | 300 | 1.000 | 3.264 | 4% |
| Frankaríki | 22 | 300 | 400 | 500 | 150 | 1.372 | 2% |
| Italia | 0 | 0 | 100 | 0 | 200 | 300 | 0% |
| Svøríki | 386 | 0 | 40 | 5.000 | 600 | 6.026 | 7% |
| Finland | 0 | 0 | 30 | 2.000 | 150 | 2.180 | 3% |
| Kanada | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0% |
| USA | 9.938 | 0 | 170 | 0 | 0 | 10.108 | 12% |
| Norra | 1.376 | 0 | 170 | 0 | 0 | 1.546 | 2% |
| Onnur | 408 | 50 | 1.690 | 900 | 1.400 | 4.448 | 5% |
| Tilsamans | 19.320 | 3.000 | 26.600 | 15.000 | 12.000 | 75.920 | 92% |
| Heimamarknaður | 4.500 | 20 | 350 | 2.000 | 0 | 6.870 | 8% |
| Tilsamans | 23.820 | 3.020 | 26.950 | 17.000 | 12.000 | 82.790 | 100% |

Kelda: Faroe Seafood

Talva 7. Søla av rækjum við skel, býtt á marknaðir.

| 2002 | Kina | Japan | Russland | Svøríki | Frankaríki | Thailand | Tilsamans | Býtið |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ísland | - | 1.130 | - | 16 | 468 | 415 | 2.029 | 2% |
| Norra | 169 | 850 | 26 | 1.834 | - | 2 | 2.881 | 3% |
| Kanada | 16.665 | 9.638 | 1.056 | 11 | 48 | 2.076 | 29.494 | 28% |
| Grønland | - | 8.489 | - | - | - | - | 8.489 | 8% |
| Danmark | 18.703 | - | 13.261 | 11.036 | 7.022 | 3.772 | 53.794 | 51% |
| Russland | - | 8.961 | - | - | - | - | 8.961 | 8% |
| Føroyar | - | - | - | - | - | - | - | 0% |
| Onnur | - | 725 | - | - | 99 | - | 824 | 1% |
| Tilsamans | 35.537 | 29.793 | 14.343 | 12.897 | 7.637 | 6.265 | 106.472 | 100% |
| Býtið | 33% | 28% | 13% | 12% | 7% | 6% | 100% | |

Kelda: exportudvalget for fisk

Orsøkin til, at Ísland pilkar so nógv í mun til egna veiðu er, at Ísland innflytir rávøru úr Norra til pilkingar. Orsøkin til, at hetta ber til er, at Norra hevur toll til ES, meðan Ísland ikki hevur. Norra skal gjalda 7,5% toll fyri alla nøgd omanfyri 5.000 tons. Føroyski útflutningurin til ES er eisini avmarkaður av einum kvotulofti. Grønland hevur fría atgongd á ES marknaðin fyri sínar rækjur.

### Rækjur við skel

Ein stórur partur av rækjunum verður seldur sum rækjur við skel. Býtið av søluni er víst í talvu 7.

Størsta útflytaralandið er Danmark, sum selir helvtina av heimsframleiðsluni. Orsøkin er hon, at Danmark selir alt fyri Grønland uttan søluna til Japans, alt fyri Føroyar og ein stóran part fyri Norra, Kanada og Ísland.

Ísland selir rættiliga lítið av rækjum við skel, tí nógv tann størsta nøgdin verður pilkað. Russland selir ein stóran part til Japans og eru hetta stórar rækjur úr Okhotska havinum, sum hava verið seldar á japanska marknaðinum í eina tíð. Hetta hevur ført við sær lægri prís á japanska marknaðinum. Alt í alt eru bara tveir útbjóðarar av rækjum við skel, nevniliga Danmark og Kanada.

Kina og Japan eru teir størstu marknaðirnir fyri rækjur við skel. Danmark og Kanada býta tann kinesiska marknaðin ímillum sín. Øll lond selja tær størstu rækjurnar til Japans, tí har er frægast prísur. Síðani selir Danmark rættiliga fitt til Svøríki, Frankaríki og Thailand. Allir marknaðir keypa kókaðar rækjur uttan Japan.

### Prísir

Prísurin á rækjum er ávirkaður av nógvum ymiskum viðurskiftum. Nevnast kunnu búskaparliga gongdin í keyparalondunum, útboðið, eftirspurningurin av rækjum, gjaldoyrakursir og onnur viðurskifti. Hartil er støddarbýti eisini avgerandi fyri prísin. Størri rækjurnar eru, betri er prísurin. Rækjur vera býttar í (i) rárækjur ella Japanrækjur, sum eru tær størstu, (ii) kókaðar rækjur, sum eru miðalstórar og (iii) ídnaðarrækjur, sum eru tær smáu rækjurnar.

### Ídnaðarrækjur

Á Flemish Cap og við Svalbard, har føroysku skipini hava veiðirættindi, eru rækjurnar smáfallandi. Vanligt býti er, at umleið helvt um helvt er ídnaðarrækjur og kókaðar rækjur. Tí er nærliggjandi at hyggja eftir prísgongdini fyri ídnaðarrækjur. Hetta eru tær rækjur sum verða pilkaðar.

Mynd 4 vísir prísgongdina av føroyskum ídnaðarrækjum og føroyskum pilkaðum rækjum.

Mynd 4 vísir, sum eisini roknast má við, at liðugtvøru- og rávøruprísirnir fyri ídnaðarrækjur fylgjast. Prísirnir hava sveiggjað nakað tey síðstu 14 árini. Prísurin gjørdi eitt rend upp í 1995 fyri síðani at fella aftur í 1996 og 1997. Annars hava prísirnir síðani 1991 verið støðugir og um tær 10 krónurnar fyri kilo. Síðani 2000 hevur prísurin verið støðugt fallandi og er nú millum 7 og 8 kr./kg.

Liðugtvøruprísurin hevur fylgt rávøruprísinum. Prísurin í 2001 var omanfyri 40 kr./kg. Men síðani er prísurin bara fallin, og í dag er hann á leið 34 kr./kg. Ábendingar úr Stórabretlandi siga, at prísurin er undir trýsti. Innflytarar bera nevniliga ótta fyri, at prísurin fer at fella seinni í ár orsakað av størri útboði. Prísirnir bæði fyri ídnaðarrækjur og pilkaðar rækjur eru falnir við 30% síðani ár 2000.

Mynd 5 vísir rávøruprísin í mun til samlaðu veiðuna av kaltvatnsrækjum. Hetta er sett upp fyri at síggja, um vaksandi útboð hevur við sær lægri prís.

Mynd 5 vísir, at útboðið var støðugt frá 1991 til 1993. Síðani fall útboðið eitt vet í 1994, sum kanska var orsøkin til, at prísurin hækkaði í 1994-95. Síðani vaks útboðið og prísurin fall.

Hinvegin vaks útboðið frá 1997 til 2000, meðan prísirnir vóru rímiliga góðir. Útboðið í 2001 fall, samtíðis sum prísurin eisini fall. Nøgdirnar eru bara hækkaðar síðani 2001, og prísurin hevur verið undir støðugum trýsti.

Lækkandi prísir á marknaðinum, hava sjálvsagt endurspeglað seg í tí prísi, føroysku rækjuskipini hava fingið fyri sínar rækjur. Ábendingar eru tó um, at prísurin sum íslendsk og norsk skip fáa í løtuni, er nakað omanfyri tann prís, sum føroysku skipini fáa.

### Kókaðar rækjur og Japan rækjur

Sølan av kókaðum rækjum er 77.000 tons, harav Kina innflytir 43% og Russland 19%. Svøríki keypir 17% og Frankaríki 10%. Stórar vónir hava verið settar Kina og Russlandi, sum væntandi fóru at keypa væl av rækjum, men tað vísir seg at vera torført at økja um søluna, uttan at prísurin fellur. Tann størsti parturin av veiðuni og harvið av kókaðu rækjunum er støddin 90-120, og tí gevur prísurin á hesari støddini eina sera góða ábending um, hvør miðalprísurin fyri rækjur er.

Kina hevur keypt hesa stødd fyri rímiliga høgar prísir, men nú eru prísirnir lækkaðir, úr ávikavist 20 niður í 14 og úr 17 niður í 12 kr./kg alt eftir miðaltali pr. kg. Hetta merkir eitt fall uppá umleið 30%. Prísirnir fyri tær minnu rækjurnar eru eisini falnir. Støddin 120-150 er fallin úr 12,50 kr./kg niður í 9,50 kr./kg og støddin 150-180 úr 11 niður í 8 kr./kg.

Stórar vónir vórðu settar Russlandi, sum hevur keypt nógvar rækjur, men orsøkin er helst hon, at prísirnir eru lágir. Russ-

Mynd 4. Prísir á føroyskum ídnaðarrækjum og pilkaðum rækjum




Kelda: Rækjuvirkið á Oyri

Mynd 5. Prísir á føroyskum ídnaðarrækjum og samlaðu veiðan av kaltvatnsrækjum




Framhald á næstu síðu

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



Talva 8. Prísir fyri kókaðar rækjur og Japan rækjur

| Stødd | jan-03 | feb-04 | Broyting |
|---|---|---|---|
| 50-70 | 50 | 44 | -12% |
| 70-90 | 30 | 22 | -27% |
| 90-120 | 20 | 14 | -30% |
| 90-120 | 17 | 10 | -41% |
| 120-150 | 12 | 9 | -25% |
| 150-180 | 11 | 8 | -27% |

Kelda: Kangamiut

Talva 10. Úrslit áðrenn rentur og avskrivingar 1999-2003.

| | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| Sólborg | 3.794 | 641 | 5.932 | -4.243 | -5.679 |
| Høgifossur | 8.095 | -761 | -203 | 4.264 | 90 |
| Arctic Viking | 9.471 | 3.761 | 5.944 | 2.160 | -1.950 |
| Napoleon | 8.791 | 2.144 | -1.777 | -2.523 | -3.423 |
| Miðal | 7.538 | 1.446 | 2.474 | -86 | -2.741 |

Talva 12. Fyritreytir, vanlig veiðisamanseting

| | Nøgd | Prísur | Søla |
|---|---|---|---|
| Eysturgrønland | 115 | 30,00 | 3.450 |
| Aðrar leiðir | 1.885 | 10,00 | 18.850 |
| Íalt / miðalprísur | 2.000 | 11,15 | 22.300 |

Talva 14. Fyritreytir ídnaðarrækjur

| | Nøgd | Prísur | Søla |
|---|---|---|---|
| Eysturgrønland | 115 | 30,00 | 3.450 |
| Aðrar leiðir | 2.285 | 8,00 | 18.280 |
| Íalt / miðalprísur | 2.400 | 9,05 | 21.730 |

land er nevniliga ein lágprísmarknaður, og prísirnir liggja tí ímillum 9 og 13 kr./kg alt eftir stødd. Sostatt skal ikki roknast við, at prísurin í Russlandi fer at lyfta sær á. Russland gevst nevniliga at keypa, tá ið prísirnir hækka. Sostatt eru tað tríggir marknaðir, sum kunnu keypa kókaðar rækjur til ein rímiligan prís, nevniliga Kina, Svøríki og Frankaríki, men so leingi útboðið stendur við og økist, eru eingi tekin um, at prísurin hækkar.

Prísirnir fyri tær stóru rækjurnar til Japans eru eisini lækkaðir. Orsøkin er einamest hon, at stórt útboð er av stórum rækjum úr tí Okhotska havinum. Eisini eru nøgdirnar úr Kanada og Grønlandi øktar. Prísirnir fyri støddina 50-70 er fallin niður á góðar 40 kr./kg og fyri 70-90 er prísurin bert 22 kr./kg. Ein miðalprísur fyri ein túr av Japan rækjum er góðar 30 kr./kg. Fyri nøkrum fáum árum síðani var prísurin millum 100-150 kr./kg.

Nevndin hevur roynt at samanborið prísir og veiðisamanseting hjá føroyska og grønlendska rækjuflotanum. Sum heild kann sigast, at prísurin sum tey grønlendsku skipini fáa er lægri enn prísurin, sum føroysku skipini fáa. Hinvegin verður hetta meir enn uppvigað við tað, at tey grønlendsku skipini fiska munandi størri nøgdir. Hetta merkir, at grønlendski flotin er í eini betri kappingarstøðu, samanborið við tann føroyska flotan.

Framtíðarútlit

Nevndin hevur – umframt at lýst marknaðin – eisini roynt at fáa innlit í, hvussu marknaðarútlitini eru komandi eitt til tvey árini. Framleiðslan av rækjum er ov stór í mun til eftirspurningin. Hartil hava lágir kursir í Japan og á dollaranum, eisini ávirkað skeiva vegin. Seinastu tíðina er dollarin tó hækkaður í mun til donsku krónuna, og fær hetta uttan iva eina positiva ávirkan á prísin á kókaðum rækjum. Høga útboðið ger tað hinvegin ringt at síggja nøkur tekin um, at marknaðarstøðan batnar tey fyrstu eitt til tvey árini.

Tá hetta er sagt skal eisini nevnast, at nevndin hevur fingið upplýst, at Føroyar frá umleið 1. jan 2005 gerast limur í alevropeiska upprunaøkinum. Hetta inniber, at m.a. norsk og íslendsk virkir kunnu virka føroyskar rækjur og selja hesar á ES marknaðin, uttan at gjalda toll. Hinvegin merkir tað eisini, at føroysk virkir kunnu virka rækjur frá skipum úr ES limalondum, londum sum hava søkt um ES limaskap og frá londunum, sum hava EBS avtalu. Rækjurnar kunnu seljast á ES marknaðin uttan toll. Mett verður, at hetta møguliga kann hava við sær, at føroysk skip kunnu fáa hægri prís fyri sínar ídnaðarrækjur. Við verandi fyritreytum kann hetta merkja eina príshækking á rækjum til pilkingar á umleið 1-1,5 kr./kg. Hesum er tó sera stór óvissa knýtt at.

Roknskapartøl

Alment

Til tess at lýsa fíggjarligu støðuna hjá rækjuflotanum, hevur nevndin kannað roknskapirnar hjá rækjuskipunum seinastu árini. Sum flestum kunnugt er talið av rækjuskipum fækkað. Hetta ávirkar eisini talið av skipum, sum eru við í uppgerðini. Átta skip eru í yvirlitinum í 1999, 2000 og 2001. Í 2002 er talið lækkað niður í 6 skip og í 2003 eru bert fýra skip við í yvirlitinum.

Av teimum 8 skipunum í 2001 eru tó 6 eftir. Havborg (gamla South Island) var ikki í rakstri í 2003 og fór ikki í rakstur fyrr enn í 2004. Kappin fór aftur til fiskiskap í mai 2003, men er longu lagdur aftur í 2004. Tí kann sigast, at 4 skip hava havt "vanligan" rakstur í 2003. Gjørt verður tí vart við, at talið av skipum, sum eru við í uppgerðini, ikki er tað sama sum tal av skipum í flotanum einstøku árini.

Tey fýra skipini sum eru við í yvirlitinum fyri 2003 eru Sólborg, Napoleon, Høgifossur og Arctic Viking.

Raksturin

Í talvu 9 eru miðaltølini fyri rækjuskipini sett upp. Raksturin hevur verið sera vánaligur seinastu árini. Í 1999 høvdu skipini eitt gott ár og miðalársúrslitið var góðar 4,5 mió kr. í avlopi. Síðani eru ársúrslitini versnaði ár undan ári og skipini hava seinastu árini havt hall. Hallið var í 2000 745 tkr. í miðal pr skip og er økt hvørt ár síðani. Í 2003 var miðalársúrslitið kr. 6,7 mió kr. í halli. Hetta hevur havt við sær, at eginpeningurin er munandi minkaður.

Tølini viðvíkjandi 2003 stava frá fyribilsroknskapum hjá feløgunum.

Niðanfyri er sett upp ein talva, sum bara umfatar skipini Sólborg, Høgafoss, Arctic Viking og Napoleon/Ocean Castle fyri árini 1999-2003. Tølini vísa úrslit áðrenn rentur og avskrivingar.

Talva 9. Miðalrakstrartøl fyri rækjuskip 1999 – 2003.

| | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| Netto søla | 30.272 | 25.200 | 31.757 | 25.712 | 26.083 |
| Úrslit áðr. Rentur og avskr. | 4.713 | 2.238 | 1.430 | 1.428 | -2.741 |
| Avskrivingar | -2.411 | -3.010 | -4.005 | -4.467 | -4.690 |
| Fíggjar postar | -1.727 | -1.073 | -1.097 | -2.186 | -820 |
| Skattur og óvanligt | 4.005 | 1.100 | 2.413 | 1.626 | 1.557 |
| Ársúrslit | 4.580 | -745 | -1.259 | -3.599 | -6.694 |

Talva 11. Gjaldførisúrslit 1999 - 2003

| | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| Úrslit áðr. rentur og avskr. | 4.713 | 2.238 | 1.430 | 1.428 | -2.741 |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 |
| Avdráttir | -2.600 | -2.600 | -2.600 | -2.600 | -2.600 |
| Gjaldførisúrslit | 913 | -1.562 | -2.370 | -2.372 | -6.541 |

Talva 13. Úrslit fyri vanliga veiðisamanseting og prísur sum gevur javnvág

| | Sannlikt úrslit | Sannlikt úrslit Við hýruendurgjaldi | Prískrav til javnvág uttan hýruendurgjald | Prískrav til javnvág við hýruendurgjaldi |
|---|---|---|---|---|
| **Fyritreytir** | | | | |
| Hýruendurgjald | 0% | 28% | 0% | 28% |
| Miðalprísur | 11,00 | 11,00 | 15,00 | 13,50 |
| **Rakstur** | | | | |
| Søluvirði | 22.250 | 22.250 | 30.250 | 27.250 |
| Hýra | -6.380 | -6.380 | -8.700 | -7.830 |
| Hýruendurgjald | 0 | 1.786 | 0 | 2.192 |
| Aðrar útreiðslur | -17.914 | -17.914 | -17.914 | -17.914 |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskr.** | **-2.044** | **-258** | **3.636** | **3.698** |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 |
| Avskrivingar | -4.500 | -4.500 | -4.500 | -4.500 |
| **Úrslit áðrenn óvanligt og skatt** | **-7.744** | **-5.958** | **-2.064** | **-2.002** |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 |
| Avdráttir | -2.600 | -2.600 | -2.600 | -2.600 |
| **Gjaldføri** | **-5.844** | **-4.058** | **-164** | **-102** |

Talva 10 vísir, at úrslitini áðrenn rentur og avskrivingar hjá teimum einstøku skipunum eru ymisk einstøku árini. Frágreiðingarnar til hesi sveiggj eru nógvar. Orsøkin kann vera, at skip missa trolreiðskapin, eyka viðlíkahald v.m. Verður tikið saman um kann sigast, at gongdin er tann, at úrslitið áðrenn rentur og avskrivingar er versnað fyri tíðarskeiðið hugt verður eftir.

Sostatt kann metast, at við verandi veiðu- og marknaðarviðurskiftum er støðan tann, at fyri eitt miðal skip vanta í 2003 áleið 2 mió kr. í, til rakstúrin, áðrenn rentur og avskrivingar, javnvigar.

Fíggjarstøðan

Í 2003 kann fíggjarstøðan fyri tey 4 skipini, sum eru við í yvirlitinum lýsast soleiðis.

- Eginognin hjá Arctic Viking er áleið null og skipið er bókað til áleið 26 mió kr.
- Eginognin hjá Høgafossi er áleið 1,5 mió kr. og skipið er bókað til áleið 28 mió kr.
- Eginognin hjá Napoleon er áleið 14 mió kr., og skipið er bókað til áleið 57 mió kr.
- Viðvíkjandi Sólborg skal nevnast, at roknskapurin hjá P/F Ísborg, sum eigur Sólborg, er ein koncernroknskapur, sum eisini umfatar nótaskipið Krúnborg. Eginognin hjá P/F Ísborg, sum umfatar bæði rækjuvinnu og nótafiskiskap, er áleið 52 mió kr. Verður Krúnborg og harvið nótafiskiskapurin hildin uttanfyri, er eginognin áleið 7 mió kr., og Sólborg bókað til áleið 32 mió kr.

Gjaldføri

Roknskapirnir hjá feløgunum vísa, at gjaldførið hjá skipunum er sera trongt og vísast kann á, at "stuttfreistaða skuldin" (skuld, ið fellur til gjaldingar innanfyri 1 ár) er fleiri ferð so stór, sum áognin saman við tøka peninginum.

Verður sagt, at miðalrentuútreiðslurnar hjá skipunum seinastu árini hava verið áleið 1,2 mió kr., meðan avdráttirnir hava verið áleið 2,6 mió kr., kann gjaldførið lýsast sum víst í talvu 11.

Raksturin undir ymiskum fyritreytum

Við støði í tí tilfari nevndin hevur útvegað sær, eru gjørdar útrokningar fyri, hvussu raksturin broytist undir givnum fyritreytum. Til tess at gera samanlíkningar er raksturin hjá einum miðal rækjuskipi lagdur sum grund. Gerast kunnu nógvar hugsandi rakstrarloysnir, men nevndin hevur í fyrsta lagi valt at hyggja at teimum, sum hon metir eru mest sannlíkar, men eisini útrokningar fyri minni sannlíkar rakstrarloysnir eru settar upp.

Nevndin hevur valt at

gera hesar útrokningar:

1. Skip, sum skipa rakst-urin eins og vanligt hevur verið seinastu nógvu árini.
2. Raksturin verður um-lagdur til í størstan mun at fiska ídnaðar-rækjur, umframt kvot-una undir Eysturgrøn-landi.
3. Tvey skip býta núver-andi kvotu í Eystur-grønlandi
4. Eitt skip fiskar alla kvotuna í Eysturgrøn-landi

Nevndin hevur sett upp hugsaðu dømini, har eitt ella tvey skip fáa gagn-nýtt alla kvotuna undir Eysturgrønlandi. Vísast skal í tí sambandi á, at rækjukvotunar í Eystur-grønlandi eru egnar kvot-ur. Tað er tí lítið sannlíkt, at eitt ella tvey skip fáa gagnnýtt kvotuna undir Eysturgrønlandi næstu eitt til tvey árini. Skal hetta verða møguligt, mugu feløgini sum hava kvoturnar avhenda hesar endaliga, ella má lógar-broyting fremjast, soleiðis at talið av skipum, sum hava hesa kvotu, verður avmarkað.

### Vanlig veiðisamanseting

Við eini vanligari veiði-samanseting er útgangs-støðið tikið í hesum nøgdum og prísum:

Fyri vanliga veiðisam-anseting eru sett upp 4 dømir:

1. Sannlíkt úrslit
2. Sannlíkt úrslit við hýru-endurgjaldi
3. Prískrav til javnvág uttan hýruendurgjald
4. Prískrav til javnvág við hýruendurgjaldi

Talva 13. Úrslit fyri van-liga veiðisamanseting og prísur sum gevur javnvág

Útrokningarnar vísa, at tað er torført at fáa rakst-urin og gjaldførið at hanga saman. Mest sann-líka úrslitið er eitt hall áðrenn rentur og avskriv-ingar, sum er góðar 2 mió kr. Útrokningarnar vísa eitt gjaldførishall, sum er áleið 5,8 mió kr. Verður roknað við einum endur-gjaldi, sum er 28% av út-goldnu hýrunum, javnvig-ar úrslit áðrenn rentur og avskrivingar nøkulunda. Framvegis kann tó rokn-ast við gjaldførishalli, sum er áleið 4 mió kr.

Útrokningarnar vísa somuleiðis, at skal gjald-førið javnviga, uttan at nøkur tiltøk verða sett í verk, má miðalprísurin á rækjum hækka við um-leið fýra krónum. Um ein skipan verður sett í verk, har skipini fáa 28% av hýrunum endurgoldnar, skal prísurin á rækjum hækka við kr. 2,50 fyri at fáa gjaldførið at javnviga.

Talva 15. Úrslit ídnaðarrækjur og prísur sum gevur javnvág

| | Sannlíkt úrslit | Sannlíkt úrslit við hýru-endurgjaldi | Prískrav til javnvág uttan hýruendurgjald | Prískrav til javnvág við hýru-endurgjaldi |
|---|---|---|---|---|
| **Fyritreytir** | | | | |
| Hýruendurgjald | 0% | 28% | 0% | 28% |
| Miðalprísur | 9,00 | 9,00 | 12,25 | 10,75 |
| **Rakstur** | | | | |
| Søluvirði | 21.600 | 21.600 | 29.400 | 25.800 |
| Hýra | -7.128 | -7.128 | -9.702 | -8.514 |
| Hýruendurgjald | 0 | 1.996 | 0 | 2.384 |
| Aðrar útreiðslur | -15.864 | -15.864 | -15.864 | -15.864 |
| | ---------- | ---------- | ---------- | ---------- |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskr.** | **-1.392** | **603** | **3.834** | **3.806** |
| | ---------- | ---------- | ---------- | ---------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 |
| Avskrivingar | -4.500 | -4.500 | -4.500 | -4.500 |
| | ---------- | ---------- | ---------- | ---------- |
| **Úrslit áðrenn óvanligt og skatt** | **-7.092** | **-5.097** | **-1.866** | **-1.894** |
| | ---------- | ---------- | ---------- | ---------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 |
| Avdráttir | -2.600 | -2.600 | -2.600 | -2.600 |
| | ---------- | ---------- | ---------- | ---------- |
| **Gjaldføri** | **-5.192** | **-3.197** | **34** | **6** |

### Umlagdur rakstur til ídnaðarrækjur og eina Eysturgrønlandskvotu

Tað hevur víst seg sein-astu árini, at tað er nær-um ómøguligt at fáa raksturin av rækjuskip-unum at javnviga. Nevnd-in hevur tí sett upp eitt hugsað dømi, har tað í størstan mun verður lagt um til at veiða ídnaðar-rækjur. Ein slík umlegging inniber, at tað er skjótari at fiska, og tí kunnu skip-ini økja samlaðu veiðuna. Hinvegin merkir hetta at miðalprísurin, sum skip-ini fáa fyri veiðuna lækk-ar, tí skipini ongar kókað-ar rækjur selja. Fyritreytir-nar, sum nýttar eru í hes-um døminum, eru:

Fyri dømið við umlagda rakstrinum eru vístar 4 útrokningar:

1. Sannlíkt úrslit
2. Sannlíkt úrslit við hýruendurgjaldi
3. Prískrav til javnvág uttan hýruendurgjald
4. Prískrav til javnvág við hýruendurgjaldi

Talva 15. Úrslit ídnaðar-rækjur og prísur sum gev-ur javnvág.

Tað vísir seg, at fyri hetta hugsaða dømið er rakstrarúrslitið nakað frægari enn við vanligum rakstri. Staðfestast kann tó, at ein slík umlegging ikki er nøktandi. Mest sannlíka úrslitið er eitt hall áðrenn rentur og av-skrivingar, sum er 1,4 mió kr. Roknast kann við ein-um gjaldførishalli, sum er áleið 5,2 mió kr. Verður roknað við einum endur-gjaldi, sum er 28% av út-goldnu hýrunum, kann roknast við einum avlopi áðrenn rentur og avskriv-ingar, sum er góðar 600 tkr. Hóast endurgjald, sum tilsvarar 28% av út-goldnu hýrunum, verður talan um eitt gjaldføris-hall, sum er knappar 3,2 mió kr.

Fyri hetta dømið skal prísurin eisini hækka munandi fyri at fáa eitt nøktandi gjaldføri. Verða ongi tiltøk sett í verk, krevst nevniliga ein prís-hækking upp á góðar tríggjar krónur, fyri at fáa eitt rímiligt gjaldføri. Hækkar prísurin kr. 3,25 fyri kg fæst eitt úrslit, sum er 3,8 mió kr. áðrenn rentur og avskrivingar. Við hesum javnvigar gjaldførið.

Um ein endurgjalds-skipan, har 28 % av hýr-unum verða endurgoldn-ar, verður sett í verk, er neyðugt, at prísurin hækkar kr. 1,75, fyri at fáa gjaldførið at javnviga.

### Tvey skip undir Eysturgrønlandi

Eitt dømi er sett upp, sum er grundað á eina støðu, har ongi tiltøk verða sett í verk. Um roknað verður við, at tvey skip fáa at-gongd til og gagnnýta veiðimøguleikarnar í Eyst-urgrønlandi, og restina av árinum troyta aðrar møguleikar, er komið til rakstrarúrslitini, sum víst í talvu 16 niðanfyri. Nýttar verða tvær ymiskar veiði-samansetingar. Ein har skipini hava vanliga veiði-samanseting og ein, har lagt verður um til ídnað-arrækjur.

Við vanligum rakstri verður roknað við eini veiðu upp á 1.600 tons. Roknað verður við, at hvørt skip fiskar 575 tons í Eysturgrønlandi og at restina av árinum kann hvørt skip fiska góð 1.000 tons á øðrum leið-um, um raksturin verður skipaður eins og vanligt hevur verið. Verður lagt um til ídnaðarrækjur, er roknað við at samlaða veiðan verður 1.900 tons. 575 tons undan Eystur-grønlandi og restina á øðrum leiðum.

Viðmerkjast skal, at tað hevur verið trupult at fingið nóg gott talgrund-arlag fyri slíkan rakstur. Reiðarar vísa á, at um royndt verður nógv undir Eysturgrønlandi, hækka viðlíkahalds – og reið-skapskostnaðirnir, men sum nevnt, er torført at fáa staðfest, hvussu stór økingin er. Út frá teimum upplýsingum nevndin hevur fingið, er sett upp eitt hugsað dømi um slík-an rakstur, men tølini mugu takast við fyrivarni.

Í útrokningunum eru viðlíkahalds – og reið-skapskostnaðirnir hækk-aðir við 750 tkr. fyri hvønn av hesum kostnað-um. Við hesum fyritreyt-um vísa útrokningarnar, at úrslit áðrenn rentur og avskrivingar er 375 tkr. í vinningi. Skipini kunnu harvið gjalda ein lítlan part av rentunum, men ongar avdráttir. Samlaða úrslitið er eitt gjaldføris-hall upp á 3,4 mió kr.

Fyri dømið, tá skipini restina av árinum bert veiða ídnarrækjur, er úr-slitið áðrenn rentur og av-skrivingar 1,35 mió kr. í vinningi. Skipini kunnu sostatt gjalda renturnar, men onki er til avdráttir. Roknað verður við einum gjaldførishalli, sum er 2,4 mió kr.

Talva 16. Úrslit um tvey skip fiska Eysturgrønlandskvotuna

| | Vanlig veiðisamanseting | Ídnaðarrækjur |
|---|---|---|
| **Rakstur** | | |
| Søluvirði | 27.520 | 27.930 |
| Hýra | -7.981 | -9.217 |
| Aðrar útreiðslur | -19.164 | -17.364 |
| | ---------- | ---------- |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskr.** | **375** | **1.349** |
| | ---------- | ---------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 |
| Avskrivingar | -4.500 | -4.500 |
| | ---------- | ---------- |
| **Úrslit áðrenn óvanligt og skatt** | **-5.325** | **-4.351** |
| | ---------- | ---------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 |
| Avdráttir | -2.600 | -2.600 |
| | ---------- | ---------- |
| **Gjaldføri** | **-3.425** | **-2.451** |

Talva 17. Úrslit um eitt skip fiskar 1.000 tons við Eysturgrønland

| | |
|---|---|
| **Rakstur** | |
| Søluvirði | 30.000 |
| Hýra | -8.700 |
| Aðrar útreiðslur | -19.664 |
| | ---------- |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskr** | 1.636 |
| | ---------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 |
| Avskrivingar | -4.500 |
| | ---------- |
| **Úrslit áðrenn óvanligt og skatt** | -4.064 |
| | ---------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 |
| Avdráttir | -2.600 |
| | ---------- |
| **Gjaldføri** | -2.164 |

### Eitt skip undir Eysturgrønlandi

Somuleiðis er sett upp eitt hugsað dømi, har ein rækjubátur fær rættin til alla Eysturgrønlandskvot-una. Inntøkan er mett út frá, at roknað verður við einum prísi, sum er 30 kr./kg. Av tí, at nevndin ikki hevur nakað tal-grundarlag fyri rækju-skip, sum hava royndt alt árið undir Eysturgrøn-landi, hevur tað hinvegin verið sera trupult at ásett útreiðslurnar. Útreiðslur-nar eru ásettar eftir ráð-føring við reiðarar. Út frá teirra ábendingum eru hesar útreiðslur ásettar, men tølini mugu takast við størsta fyrivarni.

Av tí, at roknað er við munandi minni veiðu enn tað sum er vanligt hjá einum rækjuskipi í vanlig-um rakstri, eru kostnaðir-nir til landingar- og flutn-ingsútreiðslur lækkaðir. Viðmerkjast skal eisini, at inntøkan er mett út frá at fiskað verða 1.000 tons. Tølini eru sett upp í talvu 17.

Klárar eitt rækjuskip hinvegin at fiska alla kvot-una, broytast rakstrartøl-ini munandi til tað betra. Samlaða inntøkan økist við 4,5 mió kr. Mett verð-ur, at úrslitið batnar 2-3 mió kr.

Úrslit áðrenn rentur og avskrivingar er eitt avlop upp á 1,6 mió kr. Rakstur-in ber tí allan rentukostn-aðin og ein lítlan part av avdráttunum. Samlaða úr-slitið er eitt gjaldførishall upp á 2,1 mió kr.

### Hýrur/hýruprosent

Nevndin hevur eisini við-gjørt hýrurnar hjá rækju-flotanum. Hagtøl vísa, at inntøkurnar hjá manning-unum á rækjuflotanum eru tær lægstu í føroyska fiskiflotanum. Hetta kann broytast, um talan verður um, at tað við munandi minni manningartali kann veiðast sama virði. Skuldi tað hent, kundi verið við-gjørdur tann møguleiki, at tann hækking í hýr-unum, sum liggur í lægri manningartali, verður býtt øðrvísi enn í dag, so hetta kundi verið eitt íkast til, at flotin yvirlivir.

Men hetta er alt treytað av samráðingum millum avvarðandi feløg. Nevnd-in hevur tí ikki viðgjørt hetta neyvari í sínari lýs-ing av støðuni og hevur ikki tikið hendan møgu-leika við í sínar metingar.

Ole Vagn Christensen:

# Arbeiðsmaður á Fólkatingi

Sum greitt varð frá í seinasta blaði, var danski matvøruráðharrin, og harvið fiskimálaráðharrin, Mariann Fischer Boel, í Føroyum fyrst í mai mánaði saman við Folketingets Fødevareudvalg, sum er tann nevndin í fólkatinginum, ið tekur sær av fiskivinnumálum.

Fiskimannafelagið hitti sendinevndina og greiddi henni frá føroyskum fiskivinnuviðurskiftum og serliga frá fiskidagaskipanini. Tey siga, at ferðin í Føroyum var sera væleydnað, og tey fingu nógv burturúr. Føroyski blíðskapurin var sum vera man á góðari leið. M.a. fekk sendinevndin lunda at eta á Viðareiði.



*Ole Vagn Christensen.*

Vit hittu serskilt ein av limunum á máli, og var tað Ole Vagn Christensen úr Socialdemokraterne. Hann hittu vit annars eisini í 1993, tá hann var í Føroyum saman við búskaparligu/politisku nevndini hjá fólkatinginum. Men tá vóru umstøðurnar munandi øðrvísi enn tær hóast alt eru í dag!

Tað kann sigast um Ole Vagn, at hann er ein av teimum fáu **arbeiðarunum,** sum eru á fólkatingi. Sjálvt í danska "arbeiðaraflokkinum" eru arbeiðarar næstan eins sjáldsamir og lundi á jólanátt. Men sum Ole Vagn sigur, so ynskja vit øll at geva okkara børnunm eina útbúgving, og hetta kann kanska sigast at vera eitt av úrslitunum av javnaðarpolitikki gjøgnum nógv ár. Tí fegnast Ole Vagn um, at sonur hansara væntandi fær studentsprógv í næstum.

Ole Vagn hevur sum nakar sín uppruna í arbeiðararørsluni. Hann er føddur 28. mai 1943, og pápin Poul var ketilpassari. Tey búðu á Thisted leiðini. Pápin var politiskt og fakliga virkin, og hetta ávirkaði eisini tann lítla Ole Vagn.

Hann fekk sína vanligu skúlagongd, men lærdi eisini tíðliga at arbeiða, og longu sum 10 ára gamal fór hann at arbeiða sum ørindadrongur. Í 1959 fór hann í slaktaralæru, og hetta gjørdist hansara lívsstarv. Samstundis gjørdist hann virkin í ungmannafelagnum hjá javnaðarflokkinum, DSU, har hann fekk eina leiðaraútbúgving.

Sum 20 ára gamal gjørdist hann slaktaríarbeiðari, samstundis sum hann gjørdist meiri og meiri politiskt og fakliga virkin. Í 1965 kom hann í nevndina fyri Slagteriarbejdernes Fagforening í Thisted, og nøkur ár eftir hetta gjørdist hann formaður. Seinni gjørdist hann formaðurin fyri javnaðarflokkin í Thisted, og her kann skoytast upp í, at tá flokkurin í Thisted hevði 100 ára stovningardag fyri nøkrum árum síðan, skrivaði Ole Vagn søguna hjá flokkinum í bókini: "Der er fanen til forskel".

Í 1974 varð Ole Vagn valdur inn í býráðið í Thisted, og seinni gjørdist hann formaður í socialdemokratiske býráðsbólkinum. Hann gjørdist eisini varaborgmeistari.

### Í fólkatingið

Vit hava ikki tikið øll hansara álitsstørv við her, men alt hetta kundi ikki enda við øðrum, enn at Ole Vagn stillaði upp til fólkatingið. Hann varð fyrstu ferð valdur í 1984 og sat til 1987. Tá kom hann ikki inn aftur, men síðan 1990 hevur hann sitið í fólkatinginum.

Her hevur hann eisini staðfest sína støðu sum ein dugnaligur politikkari. Hann er framsøgumaður hjá flokkinum í arbeiðara-, vinnu og føðivørumálum. Í føðivørumálum er tað serliga fiskivinnan, sum hevur hansara áhuga. Thisted, har Ole Vagn býr, liggur ikki so langt frá Hanstholm, og her hevur hann allar møguleikar at kunna seg um sjónarmiðini hjá fiskimonnunum. Her býr formaðurin í Danmarks Fiskeriforening, Thorkild Førby, og her býr eisini Peter Sand Mortensen, sum er umboðsmaður fyri teir fiskimenn, sum eru limir í danska serarbeiðarafelagnum SiD. Og sum tað skilst á Ole Vagn, so ger hann nógv burtur úr at práta við hesar um fiskivinnuviðurskifti, so hann á tann hátt fær vitan innan hetta øki. Hetta sigur ikki so lítið um ein dugnaligan og seriøsan politikkara. Tí hevur hann eisini fortreytir fyri at tosa um kvotur og fiskidagar, tá hetta kemur uppá tal.

Ole Vagn er eisini limur í Nordisk Råd, og her kemur hann í framtíðini at vera saman við Óla Breckmann og Kára Højgaard. Tað er neyvan ivi um, at teir í Ole Vagn finna ein mann, sum teir kunnu samstarva væl við. Takkað verið sítt samband hendan vegin er Ole Vagn eisini væl kunnaður um føroysk viðurskifti.

### Skammast ikki við sín uppruna

Ole Vagn er ikki bangin fyri at siga sína hugsan, og eisini at seta seg upp í móti toppunum í flokkinum. Hann var í móti teirri broyting í eftirlønini, sum Poul Nyrup Ramussen fekk trumfað ígjøgnum aftan á valið í 1998, og sum kanska var tann sakin, sum eina mest oyðilegði trúvirðið hjá tí annars dugnaliga forsætismálaráðharranum. Men Ole Vagn hevði so mikið av jarðarsambandi, at hann ánaði, hvat hetta kundi enda við. Hann ávaraði eisini um tað, men teir "klóku" í flokkinum vistu betur, við tí úrslitið, sum hetta førdi við sær.

Ole Vagn ger einki fyri at nokta sín uppruna sum arbeiðari. Á alnótini sæst, at hann av onkrum hevur verið lagdur undir at vera "middelmådig". Men hetta leggur hann ikki petti í. Sum svar hevur hann sagt, at "jeg har aldrig løftet mig over min stand, som er slagteriarbejderne, det har du ganske ret i" og "jeg lever efter Grundtvigs ord at blive ved jorden, det tjener os bedst. Kald det bare middelmådighed!"

Fyrrverandi formaðurin í fólkatinginum Erling Olsen gevur eisini Ole Vagn sítt besta ummæli. Hann sigur, at Ole Vagn er sera nógv virdur. Hann er javnaðarmaður av tí góða gamla skúlanum, sum heldur fast um tær gomlu dygdirnar. Tað hoyrist kanska ikki so nógv til hansara í miðlunum. Men hansara partur liggur ikki eftir, serliga tá tað snýr seg um at arbeiða fyri veldøminum hjá sær og at arbeiða fyri teimum, sum koma tvørt fyri í skipanini.

Hann dugir eisini væl at taka til, sum til seinasta val, tá hansara slagorð var: "Mors-Thy til gavn, stem på Ole Vagn." Hetta rímar betur tá tað verður sagt, enn tá tað verður skrivað. Men valdur bleiv hann.

Virðingin gongur báðar vegir. Ole Vagn er eisini LO-formaður í Thisted, og seinasta 1. mai hevði hann fingið Erling Olsen at halda røðu, sum var grundað á søguna í væl lýddu sjónvarpsrøðini "Krøniken", sum eisini lýsir ein part av søguni hjá danska javnaðarflokkinum við m.ø. Jens Otto Krag.

Tað skal skoytast upp í, at hesir gomlu javnaðarmenninir hugsa ikki bert um politikk. Teir fólkatingslimir, sum eru yvir 50 ár, hittast hvønn hósdag at gera fimleik saman. Og her hittast Ole Vagn og Erling eisini reguliga.

Vit takka Ole Vagn fyri samrøðuna og ivast ikki í, at í honum eiga Føroyar ein vin í fólkatinginum.



*Hesir báðir er navnar og javnaldrar, bert 3 mánaðir eru millum teir. Og so hava teir til felags áhugan fyri fiskimonnum og fiskivinnu.*



*Ole Vagn arbeiðir nógv saman við fakfeløgum, m.a. SiD, meginfelagið hjá donskum serarbeiðarum. Nakað samstundis sum vit høvdu vitjan av Ole Vagn, høvdu vit eisini vitjan úr hesum felag. Her síggja vit t.h. Orla Petersen og t.v. Svend Ove Pedersen saman við konum. Teir báðir eru deildarformenn í SiD. Teir hittust tískil tilvildarliga í Føroyum, og gav hetta teimum eitt gott høvi at tosa um felags áhugamál.*

# Bjargingarútgerð
## á sjógvi og landi

*Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð.*
*Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".*



- *Bjargingarbátar*
- *Bjargingarnet*
- *Yvirlivilsisdraktir*
- *Flótidraktir*
- *Bjargingarvestar*
- *Bjargingarkransar*
- *Epirbar/neyðsendarar*
- *Radartranspondarar*
- *Eldsløkkjarar*
- *Eldávaringar*
- *Branddraktir*
- *Umvælingar*
- *Eftirlit*



**P/F Gummibátatænastan**
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo



# Skal skipið vaskast?
**Tosið fyrst við EYSTUROYAR REINGERÐ**

- **Serkunnleiki innan vasking av aptering**
- **Vasking av maskinrúmi**
- **Reinsa teppi**
- **Bona gólv**
- **Reinsa koyggju og forheng**
- **Reinsa gamalt bonivoks**
- **Seyma nýggj forheng**
- **Útvega máttur, brúsuforheng, voksdúkar v.m.**
- **Brúsubakkar "Homequeen vinyl"**
- **Eisini leggja vit nýtt linoleum ella teppi á dúrkið**

**Eysturoyar Reingerð**
Postboks 41 · FO-650 Toftir · tlf./fax: 44 89 88
fartlf: 22 53 50 · teldupostur: nch@post.olivant.fo



# MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64



# Blákrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- ***avrúsan og viðgerð***
- ***einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)***
- ***samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)***
- ***eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi***

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** — FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 — Tlf. 31 55 75





**Vit hava stórt úrval av reiðskapi til línuveiðu**

**Vit framleiða:**
Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

***◆◆◆vælkomin inn á gólvið***

**SNØRISVIRKIÐ**
**í Klaksvík**
Tel. 455254 - Fax 457254
www.snorisvirkid.fo

**TEYMAVIRKIÐ**
**í Runavík**
Tel. 473000 - Fax 473001
www.teymavirkid.fo



**Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá**

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***
FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945

# Fiskimenn kunnu møta fiskimanni frá Ísrael á ráðstevnu 3. og 4. juni

**Sum tað hevur verið lýst í fjølmiðlunum verður 3. og 4. juni ein altjóða ráðstevna í Føroyum um skipanir av fiskiskapi. Ráðstevnan verður fyriskipað av Farec við Óla Samró.**

Her verða nógvar "kanónir" av ymiskum slag. Men tað sum vit halda vera so nýskapandi er, at her verður eisini ein fiskimaður, og tað enntá úr Ísrael.


*Menakhem Ben-Yami.*

Talan er um Menakhem Ben-Yami, sum uppruna-liga var fiskimaður. Í dag verður hann roknaður at vera ein sjálvlærdur fiskivinnuteknologur. Hetta hevur ført við sær, at Menakhem hevur havt ein hóp av álitisstørvum í Ísrael og í altjóða stovnum. Tann fremsti av hesum er FAO, sum ger eitt stórt arbeiði at menna fiskiskapin í menningarlondum. Hetta hevur ført fiskimannin Menakhem víða um, og hann hevur tískil royndir frá fiskiveiðu á øllum "sjey høvum". Hann er eisini skrivandi maður, og tað er frálíka gott skil á tí, sum hann hevur at føra fram. Umframt greinir hevur hann skrivað ritgerðir av øllum møguligum slag. Í 1996 gjørdist Menakham heiðursdoktari við lærda háskúlan í Kaliningrad.

So tað er ein royndur maður, sum kemur higar. Óli Jacobsen og hann hava annars hitst áður. Hetta var á eini IFISH stevnu um trygd og heilsu hjá fiskimonnum, sum varð hildin í USA í 2000.

Eru fiskimenn sum hava hug at koma við á hesi ráðstevnu verða teir bidnir um at venda sær til fiskimannafelagið.

# Tíðindaskriv frá Føroya Fornminnissavni

Í summar er fornminnissavnið opið hvønn dag frá sunnudegi 16. mai til sunnudag 12. september, bæði framsýningarnar í Brekkutúni og útisavnið í Hoyvík.



Leygardag og sunnudag er opið frá kl. 14 til 17, meðan tað gerandisdagar er opið frá kl. 10 til kl. 17. Fyrsta hvítusunnudag er stongt, men aðrar heilidagar er opið sum sunnudag.

Ein lítil broyting er, meðan fiskivinnuframsýningin stendur í gerð.

Seinni í summar letur upp ein gestaframsýning, nevnd "Úrtøka úr felags havi".

Fyri at gera savnið meiri atkomiligt hjá rørslubrekaðum, fingu vit 3. desember í fjør, sum er dagur teirra brekaðu, sett eina lyftu upp, so at møguligt er hjá fólki í koyristóli at sleppa inn í allar partar av framsýningini.

Sum nakað nýtt hava vit nú enn fleir bøkur í sølubúðini í framsýningini, eins og ymisk postkort verða til sølu. Um stutta tíð ber til hjá vitjandi at rinda við gjaldskorti.

Nýggja heimasíðan hjá fornminnissavninum hevur bústaðin:

www.natmus.fo

Ætlanin er at heimasíðan verður broytt og víðkað alla tíðina, so áhugað kunnu fáa sær kunnleika um savnið og virksemi hjá savninum eisini henda vegin.

Millum annað er í umbúna at leggja stóra myndasavnið hjá savninum út á heimasíðuna.

Ferðast í egnum landi – frí í Føroyum – vitja søvnini.

Regin Debess, savnslærari,
tlf. 310700 og 222587



FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Ring um lýsingar á tlf. 31 15 69
ella send eitt fax á 31 87 69
gevur MEIRI fyri MINNI




# Støðug náði

"...sum vit við trúnni eisini hava fingið atgongd við til hesa náðina, sum vit standa í..."
*Rom. 5,2*

Mong Guds børn, og kanska serliga tey ungu og tey nýggju í trúnni, ávirkast lætt av, hvat tey føla. Føla tey Jesus nær, eiga tey trúarvissu og gleðast.

Føla tey einki, ella føla tey tað, sum um Jesus er langt burturi, so er trúarvissan eisini langt burturi. Tá kann vissan í kristinlívinum lætt blíva sum eitt "Jo-Jo," ið sveiggjar upp og niður, alt eftir hvat kenslurnar siga.

Guds orð sigur, at kristinlívið og trúarvissan ikki skulu byggjast á kenslur, ikki á vit og skil, ella á hvat onnur meina, men á tað sum er støðugt og ævigt – Guds náði í Kristusi.

Tú verður eitt Guds barn við at játta syndirnar fyri Gudi, tí tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur tær syndirnar og reinsar teg frá allari órættvísi. 1. Joh. 1,9.

At játta syndirnar fyri Gudi er tí ein høvuðssannleiki í kristinlívinum, ja, er fortreytin fyri lívinum í Kristusi. Í og við fyrigeving syndanna fært tú lut í Guds náði og kemur at standa í náðini – liva í og av henni. Náðin er støðug, føst, álítandi og ævig, óansæð hvat kenslur tínar siga. Náðin ávirkast ikki av, um tú hevur tað gott, syngur lovsangir og frøist, ella tú hevur tað trupult, syngur harmaljóð, ella als ikki syngur og ert í ringum lag.

Fyrigeving syndanna – Guds náði – er tá nakað, tú støðugt hevur. Tað er eisini neyðugt, tí tað ringasta við syndini er ikki bara tað, tú gert, men tað tú ert. Synd er nakað støðugt í holdi tínum, sum allar syndir tínar koma frá. Tí hevur tú tørv fyri støðugari náði. Tá tú syndar, fellur tú ikki út úr náðini, men í henni. Samstundis sigur bíblian, at tá tú syndar, er tað ógvuliga umráðandi fyri trúarlívið, hvat tú gert.

Viðgongur tú syndirnar og játtar tær fyri Gudi, fært tú fyrigeving. Tá livir tú í ljósinum, og verður verandi í náðini – verandi í Jesusi. 1. Joh. 1,7-9

Avnoktar tú syndirnar, kveistrar tær burtur og vilt ikki játta tær, fær tú ikki fyrigeving. Verður hetta støða tín, vil syndin og myrkrið reka Jesus og ljósið út aftur úr lívi tínum, og tú fellur úr náðini – fellur frá Jesusi. 1. Joh. 1,6-10

Biður tú dagliga – av hjarta: Fyrigev okkum syndir okkara... stendur, livir tú í náðini.

*Nú kann eg hvíla, sálin er glað,*
*tí eg í trúnni klárt havi sæð:*
*hjartað er tváað, goldin mín skuld,*
*synd mín í havsins dýpi er huld.*

*Ms. 438*

# Skipsbygging Reparasjon

DOKKING
Kapasitet: Fartøylengde 140 m - Fartøybredde 26,5 m - Fartøydybde 6,5 m.
Løftekapasitet: 7600 tonn - Brønn for Azimuth propeller: 7 x 4 x 2,7 m.



WESTCON 's skips- og offshoreverft i Ølen



M/S KRÜNBORG -Bygg nr.16.

WESTCON i Ølen utfører:
- Nybygg - Ombygginger
- Dokking - Skipsreparasjoner
- Prosjektering - Konstruksjon
- Seksjonsbygging - Klassing

*Din samarbeidspartner fra idé til levering*

WESTCON
WEST CONTRACTORS AS
N-5582 Ølensvåg, NorwayTel: +47 53 77 50 00 - Fax: +47 53 77 50 01
E-mail: westcon@westcon.no - www.westcon.no








# Línubustir og goggar

Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar



Verða sendar um alt landið

**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

Fløttislið (limur í Føroya blindafelag)



**Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

FARPACK
Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com


# Landsfundur hjá sjómankvinnuringunum

Seinasta vikuskifti hildu sjómanskvinnuringarnir landsfund í Nesvík, har tað møtttu umleið 200 kvinnur og nakrir menn eisini!

Formaðurin í Fiskimannafelagnum var til staðar seinnapartin sunnudagin, og hann bar eina heilsan frá fiskimonnum. Hann legði dent á hvussu stóran týdning tað hevur, at okkara siglandi fólk hevur eitt slíkt bakland sum fleiri hundrað kvinnur má sigast at vera.

Vit hava frágreiðing og myndafrásøgn í komandi blað.



*Føroyski sjómanskvinnuringurin í Reykjavík var komin á landsstevnuna og setti sín dám á. Hesar eiga ein stóran part av æruni fyri, at vit hava eitt føroyskt sjómansheim í Reykjavík.*

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingarvirkaluna - Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar
Tlf: 311569




Innflytingargildið var upp á tað besta, tá telefonin ringdi, og innflutti maðurin tók telefonina. Tá hann hevði lagt rørið, rópti hann glaður:

– Tað var sanniliga gott, at eg ikki valdi íbúðina niðriundir – tey siga, at har er ikki verandi fyri larmi…

*****

Ein politistur steðgaði einum bilførara og segði: "Tú ert nr. 10.000, sum hevur minst til trygdarbeltið, so tú vinnur 10.000 kr. kontant og skattafrítt. – Hvat skal peningurin nýtast til?"

"Eg havi altíð ynskt mær eitt koyrikort…" var svarið.

*****

Umsøkjarin var komin at tosa um arbeiðið sum fangavørður.

– Góðan dag, eg vil fegin søkja hatta arbeiðið sum fangavørður.

– Tað ljóðar fínt, men eitt skalt tú vita, og tað er, at tað eru nakrir harðir fýrar, sum sita inni.

– Tað veit eg væl, men eru nakrir trupulleikar av teimum, so er tað ÚT!!!

*****

Ein eldri kona í einum hýruvogni:

Tit hýruvognsførarar mugu hava lættasta arbeiðið í heiminum. Tit sita jú bara á tykkara fløtu og tjena pengar.

– Tygum hava nokk rætt í tygara máli, men man tað tó ikki verða lættari at verða skrellimaður? – Teimum nýtist í øllum førum ikki at tosa við skrellið...



*Her síggja vit frá vinstru:*

*Alexandr, 2. meistari við "Mekanik Tarrasov".*
*Sólarn Isaksen, 2. meistari, Klaksvík.*
*Mikkjal Olsen, skipari, Klaksvík.*
*Árni Magnussen, dekkari, Haraldsund.*
*Slava, 2. stýrimaður við "Mekanik Tarrasov".*
*Heri Olsen, dekkari, Klaksvík.*
*Óli Hans Johannesen, dekkari, Klaksvík.*
*Sonni Vitalis, dekkari, Klaksvík.*
*Jaspur Hjelm, kokkur, Viðareiði.*
*Heini Gregersen, dekkari, Klaksvík.*
*Ingvi Ragnarson, dekkari, Klaksvík.*
*Óli Olsen, 1. stýrimaður, Klaksvík.*
*Janus Sørensen, messur, Viðareiði.*
*Hans Sofus Joensen, dekkari, Nólsoy.*

Aðra staðni í blaðnum í dag hava vit eina frásøgn um vitjanina hjá russarunum, sum vórðu bjargaðir av Sigurfarinum í 1982, í Havn hósdagin í seinastu viku.

Seinasta leygarkvøld bjóðaði Klaksvíkar Býráð teimum til døgurða saman við mannngina á Sigurfarinum og øðrum. Vit koma at greiða frá hesi samkomu í komandi blað og fara eisini at hava myndir.

Men hesa ferð hava vit eina mynd av teimum tveimum av manningini á Mekanik Tarassov" saman við teimum 12 av Sigurfarinum sum vóru til staðar:

# Manninginin á Pinsessuni

Vit hava nú fingið hesi nøvn á myndini av "Prinsessu Mariu":

2. Sigmund Jacobsen, í Búð, Nólsoy
3. Jógvan Poulsen, á Heyggi, Sandur
4. Karl Hansen, seinni Reynheim, Tórshavn.
5. Lars Jacobsen, í Króki, Nólsoy
6. Hjalmar Jacobsen, Nólsoy.
7. Dávur Davidsen, hjá Kitti, Sandur
12. Kjeld Poulsen, Nólsoy
13. Christian Poulsen, á Kák, Tórshavn
16. Rasmus Poulsen, á Kák, Tórshavn

## dagsins MYND

Í síðstu viku lógu tvær "Jónrit" á Runavík. Báðar eru merktar FD.6, og báðar hoyra heima á Strondum. Sami maður eigur báðar, ið samstundis eigur ta triðju Jónrit, ið er dóttir hansara.

Síðsta ár keypti Niels Jacob Nielsen á Strondum garnaskipið "Ólav Hvíta" og gav tí navnið "Jónrit". Hann keypti eisini samtrolaran "Akraborg" og hevur nú umbygt hann til garnaskip. "Akraborg" hevur eisini fingið navnið "Jónrit" og skal veiða uppá loyvið hjá "Jónrit", fyrrv. "Ólavur Hvíti".

"Nýggja Jónrit" er væl størri og í nógv betri standi enn "gamla Jónrit".

Tá báðir lógu við bryggju á Runavík, var tað tí, at garnaspæl, útgerð og annað skuldi flytast yvir á nýggju "Jónrit".

Tað er Mekanik í Runavík, sum hevur umbygt skipið.

Eigaranum verður ynskt góða eydnu við skipinum.

# Tvær "Jónrit" við FD.6

